SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

# Kanning av sosiala arbeiðsumhvørvinum, trivnaði og happing umborð á føroyskum skipum



**2024**

## Innihald


Lýsing av kanning........................................................................................................ 3

Frágreiðing um luttakarar ........................................................................................ 3

Svartíttleiki og umboðan............................................................................................ 4

Sosialt umhvørvi og sambond umborð .................................................................... 12

Nøgdsemi við sosiala arbeiðsumhvørvið ................................................................. 12

Stuðul í arbeiðsumhvørvinum.................................................................................. 17

Inklusión.................................................................................................................. 23

Virðismeting av starvsfelagum ................................................................................ 25

Persónligt samskifti umborð..................................................................................... 31

Niðurstøða – sosialt umhvørvi og sambond umborð................................................ 38

Happing, diskriminatión og meira ........................................................................... 40

Upplivingar við at arga.............................................................................................. 40

Baktala og slatur ...................................................................................................... 46

Niðrandi orðingar .................................................................................................... 51

Óynsktar viðmerkingar um útsjónd ......................................................................... 55

Óynsktar seksuellar viðmerkingar og kropsligt samband.......................................... 60

Útihýsing ................................................................................................................. 70

Harðskapur og hóttanir............................................................................................. 73

Greining av happingini.............................................................................................. 78

Ávirkanir ................................................................................................................. 80

Fyrr, nú og framtíðin................................................................................................. 89

Niðurstøða – happing, diskriminatión og meira ....................................................... 91

Leiklutur hjá leiðslu umborð og á landi ................................................................... 94

Týdningur av samskifti umborð og leiðslunnar ávirkan ........................................... 94

Leiðslunnar leiklutur at forða fyri happing og líknandi ...........................................110

Niðurstøða – leiklutur hjá leiðslu umborð og á landi ..............................................129

# Lýsing av kanning

Í tíðarskeiðinum frá 12. november til 17. desember 2024 varð nøgdsemiskanning gjørd av sjófólki, ið seinastu 5 árini ella part av hesum tíðarskeiði høvdu siglt við skipum, ið vóru skrásett í Føroya Skipaskrá ella Føroya Altjóða Skipaskrá.

Kanningin snúði seg fyrst og fremst um sosiala arbeiðsumhvørvið hjá sjófólki við nevndu skipum, undir hesum hvussu sjófólkini mettu um sosiala felagsskapin umborð, teirra samband við leiðslu og starvsfelagar, og hvussu leiðslan handfer skaðandi sosialan atburð. Kanningin nágreinar, um sjófólkini uppliva m.a. baktalu, happing, diskriminatión av ymsum slagi, hóttan og harðskap ella seksuellan ágang, tá ið tey starvast umborð á føroyskum skipum.

Umframt hetta vórðu luttakararnir eisini spurdir um, hvørt teir høvdu verið í samband við Sjóvinnustýrið seinastu 5 árini, og í so fall hvussu tænastan var. Spurnablaðið varð svarað á netinum.

## Frágreiðing um luttakarar

Kanningin fevndi um sjófólk, ið hava siglt við føroyskum skipum seinastu 5 árini ella part av hesum tíðarskeiði, tvs. uml. í tíðarskeiðinum november 2019 til november 2024. Mett varð, at týdningarmikið var at avmarka luttakararnar á henda hátt, av tí at vit ynskja at fáa kunnleika til sosiala arbeiðsumhvørvið á føroyskum skipum, sum tað verður lýst í nútíðini.

Avbjóðingin í kanningini var at fáa samband við so nógv sjófólk í hesum bólkinum sum møguligt. Kanningin varð deild á ymsar hættir:

1. Teldupostur til øll reiðarí í mynstringarskipanini, har spurt varð, um reiðaríið kundi senda leinki víðari til teirra manningar.
2. Teldupostur til stóran part av írestandi reiðaríum í Føroya Skipaskrá ella Føroya Altjóða Skipaskrá, har spurt varð, um reiðaríið kundi senda leinki víðari til teirra manningar.
3. Teldupostur beinleiðis umborð á skipini, um vit kendu hendan teldupost.
4. Leinki deilt á facebook-síðuni og heimasíðuni hjá Sjóvinnustýrinum.
5. Leinki deilt á heimasíðu hjá manningarfeløgum.
6. Kunning um kanningina á ymsum tíðindaportalum, sum KVF og Vágaportalinum.
7. Kunning um kanningina, tá ið sýn vóru gjørd á føroyskum skipum.

## Svartíttleiki og umboðan

Sjóvinnustýrið móttók 274 svar upp á spurnakanningina. Av hesum høvdu 257 sjófólk svarað játtandi til spurningin, um tey høvdu siglt við føroyskt skrásettum skipum seinastu 5 árini, meðan 17 svaraðu nei til sama spurning. Hóast 17 persónar, sum ikki hava siglt við føroyskum skipi seinastu 5 árini, hava svarað spurnakanningini, hevur hetta ikki skeiklað úrslitið av kanningini, tí hesi fingu ikki møguleika at svara spurningum um arbeiðsumhvørvið umborð, men vórðu leidd beinleiðis til spurningar um tænastustøðið hjá Sjóvinnustýrinum.

Sjóvinnustýrið hevur eingi tøl fyri, hvussu nógv sjófólk sigla ella hava siglt við føroyskt skrásettum skipum seinastu 5 árini, og sostatt er torført at staðfesta, hvørt kanningin er umboðandi ella ei. Sjóvinnustýrið hevur tó gjørt eina varliga meting við støði í tali av skipum, væntað miðalstødd á manning og eini tvífaldan av samlaða talinum, eftirsum vanligt er at hava skiftandi manning.

Sambært Teyggjuni eru 108 fiskiskip og 107 handilsskip skrásett í Føroya Skipaskrá, og 77 handilsskip skrásett í Føroya Altjóða Skipaskrá. Her teljast einans skip yvir 20 BT, tí tá krevst manningarskjal til skipið. 42 av handilsskipunum í Føroya Skipaskrá eru flakar, og verða hesir tí ikki taldir. Sostatt gerst talið av handilsskipum í Føroya Skipaskrá 65 skip.

Sambært ársfrágreiðingini frá 2024 hjá Reiðarafelagnum fyri handilsskip (RFH) høvdu teirra limir 1350 sjófólk í starvi, ið arbeiða umborð á 65 skipum, sum í høvuðsheitum eru skrásett í FAS. Sostatt starvast í miðal 21 sjófólk umborð á hesum handilsskipum. Av skrásettu handilsskipunum í Føroya Skipaskrá eru tó 48 skip undir 100 BT, og vantast manningin at vera umleið 2-3 sjófólk. Væntað verður sostatt, at við hesum 48 skipum starvast 6x48 = 288 sjófólk. Um ein nýtir fyrra miðaltalið til írestandi 29 handilsskipini, ið ikki eru undir 100 BT ella fevnd av reiðarafelagnum fyri handilsskip, starvast 609 sjófólk á hesum skipum. Sambært Hagstovuni vóru í januar 2024 1153 løntakarar í føroysku fiskivinnuni.

Sí samlaðu tølini niðanfyri:

| Skipabólkur | Tal av skipum | útrokning | Samlað tal |
|---|---|---|---|
| Handilsskip (RFH) | 65 | N/A | 1350 |
| Handilsskip u. 100 BT | 48 | 48 skip x 3 fólk x 2 manningar | 288 |
| Handilsskip rest | 29 | 29 skip x 21 fólk í miðal | 609 |
| Fiskiskip | 108 | N/A | 1153 |
| Sjófólk tilsamans | | | 3400 |

Útrokningarnar omanfyri geva eitt samlað tal á 3400 sjófólk. Mett verður tó, at hetta tal man vera í hægra lagi, m.a. grundað á, at summi av skipunum møguligani ikki eru í aktivari vinnu. Um ein tó fylgir hesum útrokningum, soleiðis at samlaða talið av málbólkinum er 3400 sjófólk, og 274 sjófólk svaraðu spurnakanningini, hava 8,1 % av samlaða málbólkinum svarað spurnakanningini. Hetta gevur eina feilmargin á umleið ±5.3% á einum 95 % konfidensstigi. Sostatt verður mett, at kanningin í øllum førum kann geva ábendingar um generellar tendensir innan sosiala arbeiðsumhvørvið á skipum, ið eru skrásett í Føroya Skipaskrá ella FAS.

Úrslitini av hesi kanning mugu tó takast við ávísum fyrivarni, tí vit hava í minni mun ella als ikki megnað at fingið ávísar bólkar av sjófólki við føroyskum skipum at svara spurnakanningini.

Í spurnakanningini varð at byrja við spurt um kyn, aldur og tjóðskap hjá viðkomandi, og í hvørjum starvi og við hvørjum skipaslagið viðkomandi sigldi við. Hetta fyri at kunna skilja millum upplivingarnar hjá ymiskum bólkum av sjófólki. Eitt yvirlit yvir samlaðu svarini sæst í figurunum og stabbamyndunum á fylgjandi síðum.

Her sæst, at tað er eydnast at fáa svar frá umboðum í øllum uppsettu bólkunum viðvíkjandi kyn, aldri, tjóðskapi, starvi og skipabólki, og sostatt er kanningin umboðandi fyri ymisku sjófólkini á føroyskum skipum. Tó skal nevnast, at tað eru sera fá svar innkomin frá konufólkum, sjófólki yvir 65 ár og junior meistarum. Mett verður, at hetta kann koma av, at hesi sjófólk ikki eru stórur partur av sjófólkunum á føroyskum skipum, og møguliga summir junior meistarar hava svarað, at teir eru maskinyvirmenn ella dekkarar.

Hóast lutfallið av kvinnum og eldri møguliga avspeglar lutfallið í málbólkinum, skal fyrivarni takast fyri, at greiningar, ið vísa til upplivingar hjá hesum sjófólki, byggja á fá svar, og sostatt hevur hvørt svarið stóra ávirkan á hagtølini fyri bólkin, prosentvís. Mett verður ikki, at lutfallið av juniormeistarum samsvarar við lutfallið í málbólkinum, og sostatt kann henda kanning ikki vísa á

møguligar tendensir hjá bólkinum ella munir millum upplivingar hjá juniormeistarum og øðrum starvsbólkum.









Hvørjum skipaslagi hevur tú í høvuðsheitum siglt við seinastu 5 árini (bert føroysk skip)? / On what kind of vessel have you primarily been employed on in the last 5 years (only Faroese Vessels)?

257 Responses- 17 Empty




Starv / Occupation

256 Responses- 17 Empty



Somuleiðis verður víst á, at fyri ávísar skipabólkar, kunnu ávísir starvsbólkar vera undir- ella yvirumboðaðir. T.d. eru lutfalsliga fá svar komin frá dekkarum við handilsskipum undir 500 BT, flestu sjófólk millum 16 og 25 ár sigla við fiskiskipum og eittans svar eru fingið frá útlendingi við fiskiskipi. Sostatt kunnu vit við hesi kanning t.d. ikki meta, um útlendingar, ið sigla við føroyskum fiskiskipum, hava somu fatan av arbeiðsumhvørvinum umborð á skipunum, sum teirra føroysku starvsfelagar.

Samlað verður mett, at kanningin kann geva eina ábending um, hvussu umstøðurnar eru viðvíkjandi sosialum arbeiðsumhvørvi, trivnaði og happing umborð á føroyskum skipum, men tó við vanda fyri, at ávísir bólkar av sjófólki, ið sigla við føroyskum skipum, kunnu hava øðrvísi upplivingar.


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
70,00%
60,00%
50,00%
40,00%
30,00%
20,00%
10,00%
0,00%
11,11%
33,33%
0,00%
33,33%
0,00%
22,22%
13,64%
18,18%
0,00%
4,55%
0,00%
63,64%
8,75%
20,00%
22,50%
6,25%
2,50%
40,00%
44,00%
12,00%
20,00%
16,00%
0,00%
8,00%
17,50%
20,83%
24,17%
6,67%
3,33%
27,50%
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT
Skipaslag
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer



120,00%
100,00%
80,00%
60,00%
40,00%
20,00%
0,00%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipaslag
100,00%
100,00%
98,75%
67,77%
48,00%
36,00%
11,57%
0,00%
0,00%
1,25%
0,00%
0,00%
0,00%
4,00%
11,57%
0,00%
0,00%
0,00%
12,00%
9,09%
Føroyskur / Faroese
Norðurlendskur / Northern Europe
Annað land í Evropa / Other European country
Annað / Other
Tjóðskapur
Hvørjum skipaslagi hevur...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
Hvørjum skipaslagi hevur...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT
60,00%
50,00%
40,00%
30,00%
20,00%
10,00%
0,00%
16 - 25
26 - 35
36 - 45
46 - 55
56 - 65
66 - 75
Aldur
0,00%
22,73%
22,50%
4,00%
2,48%
55,56%
18,18%
15,00%
12,00%
16,53%
22,22%
31,82%
22,50%
12,00%
26,45%
11,11%
13,64%
25,00%
28,00%
26,45%
11,11%
4,55%
11,25%
44,00%
27,27%
0,00%
9,09%
3,75%
0,00%
0,83%

# Sosialt umhvørvi og sambond umborð

Sjóvinnustýrið hevur í hesi kanning spurt spurningar, ið skulu geva eina heildarmynd av, um sjófólkini trívast og eru nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið umborð á føroyskum skipum, og verða úrslitini løgd fram og greinað niðanfyri.

## Nøgdsemi við sosiala arbeiðsumhvørvið

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg eri nøgdur við sosiala arbeiðsumhvørvið umborð" vóru 27.7 % sera samd, 46.1 % samd, 14.1 % hvørki ella, 7.4 % ikki samd og 4.7 % als ikki samd. Sostatt er størsti parturin av sjófólki á føroyskum skipum nøgdur við sosiala umhvørvið, men ein ávís ónøgd er eisini.




Býtir ein svarini upp eftir starvsbólki, er ringt at siga, um ávísir starvsbólkar eru nøgdari enn aðrir, og sæst ikki stórvegis munur á, um bólkarnir eru samdir ella ósamdir samlað sæð. Tó kann tað sýnast eins og ein størri partur av brúgvayvirmonnum, ið ikki eru skiparar, og maskinyvirmonnum ikki eru nøgdir við sosiala umhvørvið, enn tað eru í hinum starvsbólkunum.


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
2,3%
9,8%
5,8%
0,0%
0,0%
3,6%
4,7%
7,8%
7,7%
9,5%
0,0%
8,4%
14,0%
9,8%
25,0%
4,8%
16,7%
12,0%
46,5%
45,1%
32,7%
66,7%
50,0%
49,4%
32,6%
27,5%
28,8%
19,0%
33,3%
26,5%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Verða svarini býtt eftir kyni, kann tað benda á, at kvinnur í størri mun eru nøgdar við sosiala arbeiðsumhvørvið umborð, og tað eru bert menn, ið hava svarað, at teir ikki eru nøgdir. Vegna lága talið av svarum frá konufólki skulu úrslit tó takast við stórum fyrivarni.




Verður hugt at aldursbýti, eru sjófólk úr øllum aldursbólkum fyri tað mesta nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið, men sjófólk millum 26 og 55 ár, og serliga millum 26 og 35 ár, sýnast at vera meiri ónøgd, har 20.5 % er ósamd og 4.5 % als ikki eru samd við útsøgnina. Sostatt eru tey yngstu og elstu mest nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið.



Verður hugt at, um tjóðskapurin hevur ávirkan á svarini, verður ikki mett, at stórvegis munur sæst á ymsu tjóðskapunum, tó at tað kann benda á, at størri partur av føroyingum er ónøgdur enn av øðrum tjóðskapum. Sjófólk, ið ikki eru úr Evropa, siga seg øll vera nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið, men mett verður ikki, at ein generell niðurstøða kann gerast, men einans fyri handilsskip, grundað á, at øll hesi sjófólk sigla við handilsskipum.




Hyggur ein at svarunum frá ymsu skipabólkunum, síggjast tó umboð fyri allar skipabólkarnar fyri hvønn svarmøguleika, og mett verður, at eingin stórvegis munur er millum svar frá handilsskipabólkunum og fiskiskipum yvir 500 BT, tó at sjófólk við seinast nevnda í minni mun eru sera samd í útsøgnini enn sjófólki við handilsskipum. Úrslitini kunnu eisini benda á, at ein størri partur av sjófólki við fiskiskipum undir 500 BT enn í hinum bólkunum eru ónøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið.


60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki, ið sigla við fiskiskipum
0,0%
9,1%
3,8%
4,0%
5,0%
22,2%
9,1%
10,0%
8,0%
4,2%
0,0%
22,7%
12,5%
12,0%
15,0%
33,3%
45,5%
50,0%
40,0%
45,8%
44,4%
13,6%
23,8%
36,0%
30,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

## Stuðul í arbeiðsumhvørvinum

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Umhvørvið umborð er stuðlandi” siga 20.7 % av teimum spurdu seg vera sera samd í útsøgnini, 48.8 % eru samd, 19.5 % eru hvørki samd ella ósamd, 6.3 % eru ikki samd og 4.7 % eru als ikki samd í útsøgnini. Sostatt meta upp í móti 70 % av spurdu sjófólkunum umborð á føroyskum skipum, at arbeiðsumhvørvið er stuðlandi, meðan 11 % ikki meta, tað er stuðlandi.




Tað verður ikki mett, at stórvegis munur sæst á svarunum hjá ymsu starvsbólkunum, um ein hyggur at teimum, ið eru samd í hvørjum bólki samlað. Tó kann tað benda á, at tað er størri partur av brúgvayvirmonnum og maskinmonnum, ið ikki meta, at umhvørvið er stuðlandi. Her sæst, at 4.7 % av skiparum og 7.8 % av øðrum brúgvayvirmonnum als ikki eru samd í, at umhvørvið er stuðlandi, og 9.8 % av brúgvayvirmonnum, ið ikki eru skiparar, eru ikki samd við útsøgnina. Av maskinyvirmonnunum svaraðu 7.7 %, at tey ikki vóru samd og 6.8 %, at tey als ikki vóru samd. Av dekkarunum eru eisini 8.4 %, ið ikki eru samd við útsøgnina, og 2.4 %, ið als ikki eru samd. Sostatt kunnu vera partar av eini manning, ið ikki kenna seg stuðlaðan í sínum arbeiði, og kann tað vera neyðugt at arbeiða fyri at fáa betri samstarv og persónlig sambond millum sjófólkini umborð. Hetta grundað á, at kanningar vísa, at tøtt sambond umborð kunnu økja um samlaðu trygdina, tí sjófólk í størri mun hava atlit til trygdina hjá hvørjum øðrum.



60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
4,7%
7,8%
5,8%
4,8%
0,0%
2,4%
0,0%
9,8%
7,7%
0,0%
0,0%
8,4%
20,9%
17,6%
21,2%
28,6%
16,7%
16,9%
48,8%
49,0%
40,4%
52,4%
50,0%
53,0%
25,6%
15,7%
25,0%
14,3%
33,3%
19,3%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Kanningin bendir á, at sjófólk umborð á handilsskipum yvir 500 BT í størri mun meta, at umhvørvið er stuðlandi, har 20.8 % eru sera samd og 56.7 % eru samd við útsøgnini, meðan 3.3 % eru sera ósamd og 4.2 % eru ósamd.

Til samanberingar eru 24 % sera samd og 44 % samd, ið sigla við handilsskipum undir 500 BT, og 21.3 % sera samd og 42.5 % samd av teimum, ið sigla ið fiskiskipum yvir 500 BT. Av teimum, ið sigla við handilsskipum undir 500 BT, halda 4 % ikki og 8 % als ikki, at umhvørvið er stuðlandi, og fyri fiskiskip yvir 500 BT ljóða tølini ávikavist 7.5 % og 3.8 %. Av sjófólkunum, ið sigla við fiskiskipum undir 500 BT eru tó bert 13.6 % sera samd og 36.4 % eru samd í útsøgnini um, at umhvørvið umborð er stuðlandi, og 9.1 % eru ávikavist ósamd og sera ósamd, meðan 31.8 % eru hvørki samd ella ósamd.

Sostatt verður mett, at einans umleið helvtin av teimum, ið starvast umborð á smærri fiskiskipum, arbeiða í einum umhvørvi, ið er stuðlandi, meðan meiri enn ¾ av teimum, ið sigla við handilsskipum yvir 500 BT gera hetta, og onnur sjófólk liggja eitt stað í millum hesi.



60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
11,1%
9,1%
3,8%
8,0%
3,3%
22,2%
9,1%
7,5%
4,0%
4,2%
0,0%
31,8%
25,0%
20,0%
15,0%
44,4%
36,4%
42,5%
44,0%
56,7%
22,2%
13,6%
21,3%
24,0%
20,8%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Óvist er, um tað eru serliga ávísir aldursbólkar, ið meta, at umhvørvið umborð er stuðlandi, men tølini kunnu tó møguliga benda á, at sjófólk yvir 46 ár, og serliga yvir 56 ár, eru samdari í útsøgnini. Sjófólk undir 35 hava størri sannlíkindi at vera ósamd, og serliga aldursbólkurin 26-35 ár, har 18.2 % eru ósamd og 4.5 % sera ósamd í útsøgnini.

Millum tey, ið eru 36-45 ár eru heili 9.7 % sera ósamd í, at umhvørvið er stuðlandi, og einans 16.1 % sera samd, men heili 51.6 % samd, og sostatt er størstiparturin samdur, men partar av bólkinum eru sera ósamd.




Hyggur ein at, um svarini munnu vera knýtt at ávísum tjóðskapi, kunnu vit síggja, at einans føroyingar eru ósamdir í útsøgnini um, at umhvørvið umborð er stuðlandi, og 16.7 % av norðurlendingum og 22.7 % av føroyingum svaraðu, at tey hvørki vóru samd ella ósamd. Viðmerkjast skal tó, at vit hava einans móttikið svar frá føroyingum umborð á fiskiskipum, og sostatt er torført at siga, um føroyingar eru minni samdir enn møguligir starvsfelagar av øðrum uppruna umborð á fiskiskipum – altso er tað í minni mun føroyingar, ið meta, at umhvørvið er stuðlandi, ella er tað skipaslagið, ið skapar munin.

Tað er tó áhugavert at síggja, at norðurlendingar annars, sum í mestan mun sigla við handilsskipum saman við blandaðum tjóðskapum, í minni mun eru samdir við útsøgnina, samanborið við teirra starvsfelagar við uppruna uttanfyri norðurlond. Tá skal tó nevnast, at heili 41.7 % av norðurlendingunum eru sera samdir í, at umhvørvið er stuðlandi, og eru tey eins og meginparturin av sjófólkunum ikki eru ósamd í, at umhvørvið er stuðlandi - men tó í minni mun, samanborið við bólkin “annað land í Evropa” og “Annað”.

Ein kann tó hugsa, um norðurlendingar hava onnur krøv til ella uppfatan av sosiala umhvørvinum, teir eru í. Um so er, er hetta nakað, ið millum annað leiðsla má taka hædd fyri.



## Inklusión

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Sosiala umhvørvið umborð er inkluderandi”, svaraðu 22.3 %, at tey eru sera samd, 40.2 % eru samd, 27.0 % svaraðu hvørki ella, 7.4 % eru ósamd og 3.1 % eru als ikki samd. Sostatt meta meiri enn 60 %, at umhvørvið er inkluderandi, 27 % meta hvørki, meðan meiri enn 10 % ikki meta, at sosiala umhvørvið er inkluderandi.




Verður hugt at býtinum hjá ymsu skipabólkunum sæst, at í øllum skipabólkum eru sjófólk, ið meta, at tað sosiala umhvørvið er inkluderandi, og øvugt. Tó kann tað benda á, at størri partur av sjófólki við fiskiskipum undir 500 BT eru ósamd við útsøgnina enn sjófólk við øðrum skipabólkum, og sjófólk við handilsskipum yvir 500 BT í størri mun eru samd við útsøgnina.


50,0%
45,0%
40,0%
35,0%
30,0%
25,0%
20,0%
15,0%
10,0%
5,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
11,1%
0,0%
3,8%
12,0%
0,8%
0,0%
27,3%
7,5%
4,0%
5,0%
22,2%
22,7%
30,0%
24,0%
26,7%
22,2%
36,4%
41,3%
32,0%
43,3%
44,4%
13,6%
17,5%
28,0%
24,2%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í høvuðsheitum...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

## Virðismeting av starvsfelagum

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg kenni meg virðismettan av mínum starvsfelagum" svaraðu 27.7 %, at tey eru sera samd, 49.6 % eru samd, 13.7 % svaraðu hvørki ella, 6.3 % eru ósamd og 2.7 % eru als ikki samd. Sostatt kennir meginparturin av sjófólki við føroyskum skipum seg virðismett av sínum starvsfelagum, men 9 % kenna seg ikki virðismett.




Tá ið hugt verður at úrslitunum býtt eftir starvsbólkum er áhugavert at síggja, at einans umleið 80 % av skiparunum siga seg vera samdar í, at teir kenna seg virðismettar av sínum starvsfelagum, og nakrir kenna seg ikki virðismettar, hóast teir eru hægsta leiðsla umborð á skipinum. Tølini kunnu benda á, at tað er meiri sannlíkt, at maskinyvirmenn og serliga brúgvayvirmenn ikki kenna seg virðismettar, meðan líkindini eru minni fyri, at dekkarar og serliga skipskokkarnir ikki kenna seg virðismettar. Av brúgvayvirmonnunum eru 5.9 % als ikki samd og 9.8 % ikki samd við útsøgnina. Av maskinyvirmonnunum eru 1.9 % als ikki samd og 9.6 % ikki samd, meðan av dekkarunum eru 2.4 % als ikki samd og 6 % ósamd og ongin kokkur ella juniormeistari er ósamdur í útsøgnini, um hann kennir seg virðismettan. Mett verður sostatt ikki, at kenslan av virðismeting er knýtt at leiðslustiginum hjá sjófólkinum.


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
5,9%
2,3%
1,9%
0,0%
0,0%
2,4%
9,8%
9,6%
2,3%
0,0%
0,0%
6,0%
33,3%
14,0%
15,4%
14,3%
13,3%
9,8%
58,8%
52,4%
50,0%
48,2%
41,9%
33,3%
39,5%
33,3%
33,3%
30,1%
23,1%
15,7%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Grundað á úrslitini verður ikki mett, at til ber at vísa á nakran serstakan mun millum, um yngri sjófólk kenna seg meiri ella minni virðismett enn eldri sjófólk, tó at av sjófólkum millum 26 og 35 og yvir 66 møguliga er ein størri partur, ið er ósamdur við útsøgnina enn sjófólk millum 36 og 65 og millum 16 og 25. Tað kann møguliga vera ein ábending um, at sjófólk, ið eru lutfalsliga nýggj ella á veg út av arbeiðsmarknaðinum, kenna seg lutfalsliga minni virðismett enn restin av manningini.




Mett verður, at úrslitini viðvíkjandi muni millum skipabólkar til henda spurning speglar væl svarini til seinast umrødda spurning um stuðlandi umhvørvi, har sjófólk umborð á handilsskipum yvir 500 BT í mestan mun kenna seg virðismett, og nakað minni prosentpartur av sjófólki við handilsskipum undir 500 BT og fiskiskipum yvir 500 BT hava hesa meting. Aftur her eru sjófólk við fiskiskipum undir 500 BT tann skipabólkur, har minsti parturin er samdur við útsøgnina, tó at hesin partur er størri nú enn til síðsta spurning. 22.7 % eru sera samd, og 36.4 % eru samd, og nú eru 9.1 %, ið als ikki eru samd og eingin hevur svara “ikki samdur”. Umborð á fiskiskipum yvir 500 BT svara 11.3 %, at eru ósamd og 1.3 %, at tey als ikki eru samd við, at tey kenna seg virðismett, og av teimum, ið sigla við handilsskipum undir 500 BT svara 8 %, at tey ikki eru samd, og 4 %, at tey als ikki eru samd.



Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
0,0%
9,1%
1,3%
4,0%
2,5%
0,0%
0,0%
11,3%
8,0%
4,2%
22,2%
31,8%
11,3%
16,0%
10,8%
44,4%
36,4%
45,0%
44,0%
56,7%
33,3%
22,7%
31,3%
28,0%
25,8%
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Hyggur ein at kynsbýtinum í svarunum, sæst, at tað einans eru menn, ið siga seg ikki kenna seg virðismettar av starvsfelagunum, og viðvíkjandi tjóðskapi eru tað aftur føroyingar, sum eru minst samdir í útsøgnini. Tó skal nevnast, at samanborið við spurningarnar um nøgdsemi við sosiala arbeiðsumhvørvið og um tað er stuðlandi, er lutfalsliga stórur partur av sjófólkum uttanfyri norðurlond, ið svara "hvørki ella". Óvist er, hví hetta man vera, men møguleiki er fyri, at tað yvirhøvur í sjómentan verður hugsað minni um, hvussu ein verður virðismettur, og tískil hava nógv sjófólk sum heild ikki skapt sær eina fatan av hesum – ella ein neiligari útlegging, at sjófólk, ið ikki eru norðurlendingar, í ávísan mun ikki kenna seg virðismettar.






Sum heild skal vísast á, at tað hevur týdning, at sjófólk kenna seg virðismett í teirra arbeiði og millum sínar starvsfelagar við atliti til sálarliga heilsu og hugin at arbeiða. Tí er tað gleðiligt, at stórur partur av sjófólki kennir seg virdan. Men neyðugt er at hyggja nærri at hesum, sum heild, men eisini serliga umborð á smærri fiskiskipum og millum ávísar bólkar, sum t.d. brúgvayvirmenn og maskinyvirmenn, nýggj og eldri sjófólk og serliga millum føroyingar.

## Persónligt samskifti umborð

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg kenni meg tryggan at tosa um persónligar trupulleikar við starvsfelagar" svaraðu 17.6 %, at tey vóru sera samd, 36.7 % vóru samd, 25.4 % hvørki ella, 11.3 % ikki samd og 9 % als ikki samd. Sostatt kennir umleið helvtin av føroyskum sjófólki seg tryggan at tosa við sínar starvsfelagar um persónligar trupulleikar, meðan umleið 1/5 partur ikki kennir seg tryggan við hetta.




Verða úrslitini býtt upp eftir skipabólki, ið sjófólkini sigla við, sæst, at umboð fyri allar skipabólkarnar eru fyri hvønn svarmøguleika, men tað kann benda á, at sjófólk við fiskiskipum samlað sæð kenna seg minni trygg við at tosa við teirra starvsfelagar um persónligar trupulleikar, enn sjófólk, ið einans sigla við handilsskipum. 18.2 % av sjófólkum við fiskiskipum undir 500 BT hava svarað ávikavist, at tey eru ósamd ella als ikki samd, og 11.3 % av sjófólki við fiskiskipum yvir 500 BT eru als ikki samd, meðan 13.8 % av hesum eru ósamd við útsøgnina.


45,0%
40,0%
35,0%
30,0%
25,0%
20,0%
15,0%
10,0%
5,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
0,0%
18,2%
11,3%
8,0%
6,7%
22,2%
18,2%
13,8%
8,0%
8,3%
33,3%
13,6%
26,3%
28,0%
25,8%
11,1%
40,9%
33,8%
32,0%
40,8%
33,3%
9,1%
15,0%
24,0%
18,3%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Hyggur ein at svarunum býtt eftir aldri, sæst, at tað ikki er ein ávísur aldursbólkur, ið kennir seg tryggan ella ótryggan at tosa um persónligar trupulleikar. Tó kann tað benda á, at sannlíkindini eru størri fyri, at tú ert ósamdur við útsøgnina, um tú ert yngri enn 45, enn um tú ert eldri. Hetta er áhugavert, tá ið ein vanliga sigur, at yngri ættarliðið oftani tosar meira opið enn eldra ættarliðið. Men møguliga tað kann vera ein ímynd av, at yngra ættarliðið metir, at teir áttu at kunna tosa um meiri, meðan eldra ættarliðið ikki ynskir at tosa um trupulleikar við sínar starvsfelagar.




Mett verður ikki, at stórvegis munur sæst millum svarini hjá konufólki og mannfólki, tó tað einans eru mannfólk, ið siga seg ikki vera samd í hesum. Hetta kann verða grundað á mentan millum mannfólk, har ein í munni mun enn konufólk tosar um persónlig viðurskifti.

Býtir ein svarini upp eftir starvsbólkum, sæst eisini, at eingin starvsbólkur einans er samdur ella ósamdur við útsøgnina, hóast summir starvsbólkar møguliga kenna seg tryggari við at tosa um persónligar trupulleikar við sínar starvsfelagar. Her kann ein møguliga nevna dekkarar, har 42.2 % eru samd og 21.7 % eru sera samd við útsøgnina, um tey kenna seg trygg at tosa um persónligar trupulleikar við starvsfelagar.




Tað kann tykjast sum føroyingar kenna seg minni tryggan at tosa um persónlig viðurskifti enn sjófólk av øðrum uppruna.




Samlað, verður mett, at tað er torført at siga, um tað eru ávís sjófólk, sum kenna seg tryggari at tosa um persónlig viðurskifti umborð, eftirsum svarini eru nakað væl býtt millum tey parametur, ið eru sett upp. Tó kann tað benda á, at skipaslagið og aldur í ávísan mun kann ávirka, um sjófólkini kenna seg trygg at tosa við starvsfelagar um persónligar trupulleikar, men kann hugsast at persónligheitin

yvirhøvur kann hava stóra ávirkan her. Hesi úrslit, kunnu tó vísa á ymisleika hesum viðvíkjandi millum starvsfólk, og tí skal takast atlit til hetta í samskiftinum.

Við støði í at sjófólk ofta eru avbyrgd frá sínum nærmastu, tá ið tey eru umborð í longri tíðarskeið og samstundis bæði búgva og arbeiða undir heilt serstøkum umstøðum, verður mett, at tað er av stórum týdningi at eggja til opið samskifti, bæði á tí arbeiðsliga og persónliga økinum. Sjófólk kenna javnan heimlongsul, tí tey missa týdningarmiklar løtur og upplivingar saman við sínum kæru. Umframt hetta kunnu truplar støður á heimafrontinum elva til eyka strongd, tí sjófólkið grundað á sítt starv ikki hevur møguleika at ávirka støðuna ella vera til staðar hjá sínum næstu í ávíst tíðarskeið.



Procentpartur av sjófólki býtt eftir starvi
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer
7,0%
15,7%
7,7%
0,0%
0,0%
9,6%
11,6%
9,8%
15,4%
19,0%
0,0%
8,4%
25,6%
19,6%
38,5%
38,1%
16,7%
18,1%
30,2%
43,1%
25,0%
38,1%
50,0%
42,2%
25,6%
11,8%
13,5%
4,8%
33,3%
21,7%

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg kenni meg tryggan at tosa um persónligar trupulleikar við mína leiðslu umborð” svaraðu 21.9 %, at tey vóru sera samd, 34.4 % vóru samd, 25.4 % hvørki ella, 9.8 % ikki samd og 8.6 % als ikki samd. Sostatt eru umleið eins stórur partur, ið kennir seg tryggan at tosa við sín leiðara um persónligar trupulleikar, men nakað størri partur kennir seg tryggan at tosa við sín leiðara enn við sínar starvsfelagar um persónligar trupulleikar.

Tað er sera jaligt, at stórur partur av sjófólkum kenna seg trygg at tala við starvsfelagar og leiðslu um persónligar trupulleikar – við atliti til, at summir persónar náttúrliga vilja verið afturhaldandi. Hóast hetta er ynskiligt, um enn fleiri kendu seg trygg við hetta til fyrimuns fyri sálarligu heilsuna hjá sjófólkum. Serliga er tað týdningarmikið, at sjófólk kenna seg nóg trygg at boða frá, tá serliga umstøður gera seg galdandi, ið krevja at sjófólk fáa loyvi at mynstra av. Men er tað eisini gleðiligt, um styrkt sambond umborð kann skapast millum manningina, so ein kann finna stuðul við tí persónliga eins væl og við tí arbeiðsliga.



## Niðurstøða – sosialt umhvørvi og sambond umborð

Úrslitini omanfyri vísa, at umleið 70 % av sjófólki á føroyskt skrásettum skipum eru nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið og meta, at tað er stuðlandi, meðan umleið 60 % meta, at tað er inkluderandi. Sostatt eru millum 30 og 40 % av føroyskum sjófólkum ónøgd ella eitt stað millum beinleiðis nøgd og ónøgd.

Umleið 75 % av sjófólkunum kenna seg virðismett av sínum starvsfelagum, meðan 9 % ikki kenna seg virðismett. Úrslitini metast ikki at ávirkast av leiðslustigi sjófólksins, men sýnist tað er vera meiri sannlíkt at kenna seg viðurkendan, um ein er skipskokkur ella dekkari, enn um ein er brúgva- ella maskinyvirmaður. Tað sýnist eisini, sum tað er størri møguleiki fyri, at ein ikki er nøgd/ur við sosiala arbeiðsumhvørvið ella heldur tað er stuðlandi, um ein er brúgva- ella maskinyvirmaður, samanborið við aðrar starvsbólkar. Sostatt sýnast hesir starvsbólkar nakað ónøgdari enn aðrir.

Ein ávísur aldursmunur kann møguliga síggjast, har sannlíkindini eru størri fyri, at eldri sjófólk eru nøgd við sosiala umhvørvið og meta, at tað er stuðlandi, men eisini tey yngstu sjófólkini eri nøgdari enn sjófólk millum 26 og 55 ár. Viðvíkjandi virðismeting kunnu úrslitini møguliga vísa, at sjófólk, ið eru nýggj á ella á veg út av arbeiðsmarknaðinum kenna seg lutfalsliga minni virðismett enn onnur.

Tað eru serliga føroyingar, ið eru ónøgdir og ikki kenna seg virðismettar, men mett verður, at tað er óvist, um tað er grundað á væntanir og atferð mótvegis føroyingum, ella um tað skyldast, at hesi sigla við fiskiskipum, har ónøgdin er stór. Lutfalsliga stórur partur av norðurlendingum metir ikki beinleiðis, at umhvørvið er stuðlandi, og mett verður, at ein má hava í huga, at sjófólk av ymsum uppruna kunnu hava øðrvísi krøv og uppfatanir enn starvsfelagar sínir. Viðvíkjandi kenslu av virðismeting frá starvsfelagum eru lutfalsliga nógv sjófólk av øllum tjóðskapum, ið svara “hvørki ella”, og hetta kann vera ein ábending um, at hetta er eitt evni, ið vanliga ikki verður hugsað um.

Eftirsum sera fá svar eru innkomin frá konufólki, eru samanberingar millum kynini serliga ivasamar. Innkomnu svarini kunnu tó benda á, at konufólk eru nøgdari enn mannfólk, og at tey í størri mun enn mannfólkini kenna seg virðismett umborð.

Mett verður, at munur sæst millum skipabólkarnar. Nøgdsemi, stuðulin, inklusiónin og kenslan av virðismeting er størst umborð á handilsskipum yvir 500 BT og minst umborð á fiskiskipum undir 500 BT, meðan størri fiskiskip og minni handilsskip eru eitt stað í millum.

Kanningin vísir, at einans umleið helvtin av sjófólkum kenna seg beinleiðis trygg við at tosa við starvsfelagar og leiðslu um persónligar trupulleikar. Sannlíkindini fyri, at tú kennir teg tryggan at tosa

persónliga við starvsfelagar er størri, um tú siglir við handilsskipum, ert yvir 45 ella ert konufólk. Eisini kann tjóðskapur hava ávirkan á hetta, men mett verður eisini, at persónleikin hjá tí einstaka kann hava ávirkan, og harvið má rúm vera fyri ymisleika, samstundis sum eggjað verður til opið samskifti, har ein kann stuðla hvørjum øðrum.

Endaliga skal vísast á, at hóast størsti parturin av sjófólki umborð á føroyskt skrásettum skipum er nøgdur, er í minsta lagið 4. hvørt sjófólk, ið ikki beinleiðis er nøgt við sosiala umhvørvi ella kennir seg stuðlað av manningini. Sum heild kann tað sýnast sum, at í nógvum førum er ov lítil kensla av felagsskapi. Vandi er fyri, at hetta kann skapa mistrivnað, og í síðsta enda sálarligar avbjóðingar ella fráfall til onnur skip ella aðra vinnu. Mett verður, at sjóneyka skal setast á at skapa betri felagsskap og persónlig sambond umborð, og serliga umborð á fiskiskipum undir 500 BT og millum teir bólkar av sjófólki, ið sýnast verða mest ónøgd sambært omanfyristandandi greining.

# Happing, diskriminatión og meira

Sjóvinnustýrið hevur í spurnarblaðnum spurt um upplivingar hjá sjófólki viðvíkjandi diskriminatión, happing ella aðrari negativari sosialari atferð umborð, og verða svarini greinað niðanfyri.

## Upplivingar við at arga

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: Tú ella onnur verða argað vegna kyn, húðarlit, tjóðskap ella religión" svaraðu 73.4 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 26.6 % upplivað, at tey sjálvi ella onnur verða argað við tí nevnda. 13.7 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 7.8 % svara onkuntíð, 3.9 % svara ofta og 1.2 % svara sera ofta.




Hyggur ein at svarunum býtt á, hvørjum skipabólki sjófólkini hava siglt við seinastu 5 árini, sæst, at sjófólk við øllum skipabólkum uppliva arging av hesum slag, men meðan ávikavist 80 % og 78.3 % av teimum, ið sigla við handilsskipum undir 500 BT og handilsskipum yvir 500 BT, ongantíð hava upplivað hetta, hava ávikavist 68.8 % og 63.6 % av teimum, ið sigla við fiskiskipum yvir 500 BT og fiskiskipum undir 500 BT ongantíð upplivað tað. Sostatt er størri møguleiki at upplivað tílíka arging umborð á fiskiskipum, og serliga kann ein uppliva hetta ofta umborð á fiskiskipum yvir 500 BT, har 2.5 % siga seg uppliva tað sera ofta, og 6.3 % upplivað tað sera ofta. Umborð á fiskiskipum undir 500 BT sigur eingin seg uppliva tað ofta, men 18.2 % uppliva tað onkuntíð.


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
0,0%
0,0%
2,5%
0,0%
0,8%
0,0%
0,0%
6,3%
0,0%
4,2%
0,0%
18,2%
7,5%
16,0%
5,0%
44,4%
18,2%
15,0%
4,0%
11,7%
55,6%
63,6%
68,8%
80,0%
78,3%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Eisini summi á handilsskipum yvir 500 BT uppliva tað ofta, har ávikavist 0.8 % og 4.2 % svara, at tey uppliva tað sera ofta ella ofta.

Sostatt finst arging av hesum slag umborð á øllum skipasløgum, men umborð á fiskiskipum sýnist hetta at vera ein størri partur av mentanini enn umborð á handilsskipum.

Viðvíkjandi sosiala arbeiðsumhvørvinum vóru sjófólkini biðin um at koma við møguligum viðmerkingum. Soleiðis skrivar ein, ið sigur seg sjáldan hava upplivað seg ella onnur verða argað vegna kyn, húðarlit, tjóðskap ella religión:

*"At man má minnast til, at hóast summi av hesum tingunum fara fram, er tað ikki við niðrandi undirtónum. Eg havi upplivað, at menn hava prikað til hvønn annan, men tað hevur ongantíð verið negativt."*

Niðanfyri sæst dømi um annað sjófólk, ið hevur aðra uppliving og sera ofta upplivir, at sjófólk verða argað vegna kyn, húðarlit, tjóðskap ella religión. Sjófólkið nevnir, at niðrandi orð verða søgd, tá ið ein t.d. ikki megnar at arbeiða á sama støði sum restin av manningini, ella at ein hoyrir fyri tað, at ein er av øðrum uppruna enn restin av manningini:

*"Føroyski fiskimaðurin er lítið verdur. Um hýran er góð á skipinum, tú ert við, mást tú bara finna teg í umhvørvinum. Um leiðsla ella mannskap er niðurgerandi. Yngra ættarliðið dugir betur at fara væl við fólki og sjáldan halda nakran fyri rukku. Í mínum royndum er tað oftast ein yvirmaður, ið er niðurgerandi ímóti mannskapi. Serliga um tað kanska er onkur, ið ikki lærir líka skjótt sum aðrir, er ofta rópt og skeldað eftir hesum fólki. Eg (...) fái ofta niðurgerandi viðmerkingar fyri mítt fólkaslag."*

Nevnast skal, at sami persónur eisini hevur svarað, at happing og chikana er ein minkandi trupulleiki umborð á skipum, og verður tað omanfyri grundað á, at yngra ættarliðið hevur øðrvísi atburð.

Verður hugt eftir, um aldursbólkar svara ymiskt, kann talvan niðanfyri eisini stuðla útsøgnini hjá sjófólkinum, tí tað kann benda á, at tey yngstu sjófólkini í størri mun uppliva, at tey ella onnur verða argað við nevndu viðurskiftum:




Hóast tað er torført at gera nakra niðurstøðu viðvíkjandi muni á kynunum, tí talið av svarum frá konufólki er sera lágt, geva svarini ábendingar um, at konufólk í størri mun uppliva arging persónliga ella av starvsfelagum vegna kyn, húðarlit, tjóðskap ella religión.




Stórvegis munur sýnist ikki at vera millum ymisku tjóðskapirnar – tó eru tað einans norðurlendingar og serliga føroyingar, ið oftari uppliva nevndu arging.




Verður hugt at, um starvsbólkarnir svara ymiskt, er sera týðiligt, at skiparar í stóran mun ikki uppliva hesa arging, har 86 % av skiparum nevna seg ongantíð uppliva tað, meðan sjófólk av lægri rang í størri mun uppliva tað, serliga dekkarar, har 67.5 % ongantíð uppliva tað. Eisini ein partur av brúgva- og maskinyvirmonnunum siga seg uppliva slíka arging ofta, og í nógv størri mun enn skiparar. Tað sýnist sostatt, at skiparar í summum førum ikki hava somu fatan av sosiala arbeiðsumhvørvinum sum teirra starvsfelagar.



Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
100,0%
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer
86,0%
83,3%
76,2%
73,1%
70,0%
67,5%
16,7%
10,8%
9,5%
8,0%
4,7%
3,8%
16,0%
15,4%
14,3%
15,7%
7,0%
7,7%
4,0%
2,3%
3,6%
2,0%
2,4%

## Baktala og slatur

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: baktala og slatur um teg ella starvsfelagar" svaraðu 28 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 72 % upplivað baktalu og slatur um seg ella starvsfelagar. 30.4 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 26.8 % svara onkuntíð, 8.2 % svara ofta og 6.6 % sera ofta.




Verður hugt at, um munur er á skipabólkunum, sæst, at sjófólk umborð á øllum skipabólkum siga seg uppliva slatur, og við øllum skipabólkum eru partar av sjófólkum, ið siga seg uppliva tað ofta. Tað bendir tó á, at tað er størri møguleiki at uppliva baktalu á fiskiskipum enn á handilsskipum. Her vísa vit til, at 40 % av spurdum sjófólkum á handilsskipum undir 500 BT og 31.4 % á handilsskipum yvir 500 BT svara, at tey ongantíð uppliva slatur um seg ella starvsfelagar, meðan 22.7 % av sjófólki á fiskiskipum undir 500 BT og 23.8% á fiskiskipum yvir 500 BT svara tað sama.

Verður hugt at svarunum býtt eftir starvsbólki, er tað aftur sera týðiligt, at ein stórur partur av skiparum hevur øðrvísi fatan av sosiala umhvørvinum umborð enn manningin, har teir í nógv minni mun enn aðrir starvsbólkar uppliva, at baktala ella slatur um seg ella starvsfelagar fer fram umborð, og er tað einasti starvsbólkur, ið ongantíð svarar, at hetta fer fram sera ofta.


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
50,0%
45,0%
40,0%
35,0%
30,0%
25,0%
20,0%
15,0%
10,0%
5,0%
0,0%
11,1%
9,1%
7,5%
0,0%
6,6%
0,0%
9,1%
12,5%
16,0%
4,1%
44,4%
27,3%
31,3%
16,0%
24,8%
44,4%
31,8%
25,0%
28,0%
33,1%
0,0%
22,7%
23,8%
40,0%
31,4%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
53,5%
33,3%
29,4%
26,9%
33,3%
33,7%
28,8%
26,5%
32,6%
33,3%
33,3%
27,5%
27,7%
23,5%
23,8%
23,1%
16,7%
13,5%
16,7%
9,8%
7,7%
4,8%
6,0%
9,8%
4,7%
4,8%
6,0%
9,3%
0,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Hóast ein vegna fá svar frá konufólki skal vera sera varin at gera niðurstøður, kunnu úrslitini benda á, at konufólk í størri mun enn mannfólk uppliva, at baktala og slatur um seg ella starvsfelagar fer fram umborð.




Ábendingar eru um, at sjófólk úr Føroyum og Norðurlondum annars í størri mun uppliva slatur og baktalu enn aðrir tjóðskapir. Tað, at norðurlendingar annars eisini svara, at nógv baktala fer fram, bendir møguliga á, at sjófólk av ymiskum uppruna hava øðrvísi fatan av sosiala umhvørvinum umborð. Møguleiki er eisini fyri, at sub-kulturar skapast umborð, har sjófólk í størri mun samskifta sosialt við sjófólk við líknandi bakgrund, meðan samskifti við onnur sjófólk í størri mun er viðvíkjandi arbeiði og praksis. Sama frágreiðing kann eisini nýtast til at greiða frá muninum millum tjóðskapirnar fyri aðrar spurningar.

Um so er, fáa ymisku tjóðskapirnir øðrvísi fatan av sosiala umhvørvinum, tí í hvørjum sub-kulturi finnast øðrvísi sosialar spælireglur, har slatur, baktala og arging við nevndu faktorum møguliga er vanligari í norðurlondum. Hetta er tó bert ein tulking av úrslitunum, ið ikki kann staðfestast uttan at meiri kvalitativar kanningar verða gjørdar.


Procentpartur av sjófólki býtt á tjóðskap
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
6,9%
12,5%
0,0%
0,0%
9,8%
4,2%
0,0%
0,0%
30,9%
12,5%
20,0%
0,0%
29,4%
45,8%
33,3%
14,3%
23,0%
25,0%
46,7%
85,7%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Tjóðskapur / Nationality
Føroyskur / Faroese
Norðurlendskur / Northern Europe
Annað land í Evropa / Other European country
Annað / Other

## Niðrandi orðingar

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: Niðrandi orð verða søgd við teg" svaraðu 50.4 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 49.6 % upplivað, at niðrandi orð vórðu søgd við tey seinastu 5 árini. 25.8 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 15.6 % svara onkuntíð, 3.5 % svara ofta og 4.7 % svara, at niðrandi orð sera ofta verða søgd við tey umborð.




Verður hugt at, um sjófólk, ið sigla við ávísum skipum, hava øðrvísi upplivingar, kann úrslitið týða á, at sjófólk, ið sigla við fiskiskipum oftari uppliva niðrandi orðingar. Einans 36.4 % og 40 % av teimum, ið ávikavist sigla við fiskiskipum undir 500 BT og fiskiskipum yvir 500 BT hava ongantíð uppliva hetta, meðan 68 % og 58. 3 % av teimum, ið sigla við ávikavist handilsskipum undir 500 BT og yvir 500 BT svara tað sama.

Eisini kann tað týða á, at yngri sjófólk og sjófólk, ið sigla í lægri størvum, oftari móttaka niðrandi orð, enn eldri sjófólk og yvirmenn ella serliga skiparar.


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
11,1%
4,5%
8,8%
0,0%
2,5%
11,1%
4,5%
2,5%
8,0%
2,5%
11,1%
31,8%
18,8%
24,0%
9,2%
44,4%
22,7%
30,0%
0,0%
27,5%
22,2%
36,4%
40,0%
68,0%
58,3%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer
0,0%
8,0%
3,8%
0,0%
16,7%
6,0%
2,3%
2,0%
5,8%
4,8%
0,0%
3,6%
4,7%
18,0%
13,5%
19,0%
33,3%
19,3%
16,3%
24,0%
23,1%
28,6%
16,7%
32,5%
76,7%
48,0%
53,8%
47,6%
33,3%
38,6%


Procentpartur av sjófólki býtt á aldur
Svar
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Aldur / Age
16 - 25
26 - 35
36 - 45
46 - 55
56 - 65
66 - 75
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
11,1%
43,2%
33,3%
24,2%
83,3%
53,2%

## Óynsktar viðmerkingar um útsjónd

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: óynsktar viðmerkingar um mín kropp og útsjónd" svaraðu 76.6 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 24.4 % upplivað óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd. 13.3 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 7.4 % svara onkuntíð, 2.3 % svara ofta og 0.4 % av teimum spurdu svara, at tey sera ofta fáa óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd.




Hyggur ein at svarunum býtt eftir skipabólki, sæst, at sjófólk við øllum skipabólkum uppliva óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd. Meðan umleið 80 % av sjófólki, ið sigla við annaðhvørt fiskiskipi undir 500 BT ella við handilsskipum ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini, siga einans 67.5 % av teimum, ið sigla við fiskiskipum yvir 500 BT og 55.6 % av teimum, ið sigla við báðum skipabólkum, seg ongantíð hava upplivað óynsktar viðmerkingar til teirra kropp ella útsjónd. Hyggur ein at, hvør svarar, at tey *onkuntíð* hava upplivað tað, svara 33.3 % av teimum, ið sigla við bæði handils- og fiskiskipum, 18.2 % av teimum, ið sigla við fiskiskipum undir 500 BT og 7.5 % av teimum, ið sigla við fiskiskipum yvir 500 BT hetta, meðan talið fyri handilsskip er 4 % fyri hvønn støddarbólk.

Mett verður sostatt, at sjófólk, ið sigla við fiskiskipum fáa óynsktar viðmerkingar oftari enn umborð á handilsskipum, tó at summi sjófólk á handilsskipum oftani fáa tílíkar viðmerkingar.


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
0,0%
0,0%
0,0%
0,0%
0,8%
0,0%
0,0%
2,5%
4,0%
2,5%
33,3%
18,2%
7,5%
4,0%
4,2%
11,1%
0,0%
22,5%
12,0%
10,0%
55,6%
81,8%
67,5%
80,0%
82,5%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Hvørjum skipaslagi hevur...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Verða svarini býtt eftir aldri sjófólksins, kann úrslitið benda á, at yngri sjófólk í størri mun enn teirra eldri starvsfelagar fáa óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd. Einans 59.3 % av teimum spurdu millum 16 og 25 ár fáa ongantíð nevndu viðmerkingar, meðan 85.5 % av teimum 56 – 65 ára gomlu ongantíð fáa tað.




Tað sýnist ikki sum ávísir starvsbólkar serliga fáa óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd, tó at skiparar møguliga í minni mun, og aðrir brúgvayvirmenn og maskinmenn í størri mun ella oftari, uppliva at fáa slíkar viðmerkingar, tó tað eru sera fá, ið oftani hava upplivað tað seinastu 5 árini. Hyggur ein t.d. at svarunum frá brúgvayvirmonnun, ið ikki eru skiparar, sæst, at 2 % svara sera ofta, 3.9 % ofta, 5.9 % onkuntíð og 23.5 % sjáldan, til spurningin um hvussu ofta tey hava fingið óynsktar viðmerkingar um kropp ella útsjónd.

Av tí at talið av juniormeistarum, ið hava svara spurnarblaðnum, er sera lágt, verður ikki mett, at ein kann gera nakra ítøkiliga niðurstøðu um, at teir als ikki fáa tílíkar viðmerkingar.


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
0,0%
2,0%
0,0%
0,0%
0,0%
0,0%
2,3%
3,9%
1,9%
0,0%
0,0%
2,4%
2,3%
5,9%
9,6%
4,8%
0,0%
10,8%
7,0%
23,5%
11,5%
19,0%
0,0%
10,8%
88,4%
64,7%
76,9%
76,2%
100,0%
75,9%

Tað sýnist ikki eins og stórvegis munur er á kynunum, viðvíkjandi um tey fáa óynsktar viðmerkingar um kropp ella útsjónd. Ávikavist 80 % av kvinnunum og 76.5 % av monnunum hava ongantíð fingið slíkar viðmerkingar seinastu 5 árini.




Hyggur ein at, um sjófólkini, ið fáa óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd, hava ávísan tjóðskap, sæst, at einans evropearar uppliva hetta, og í størstan mun og oftast føroyingar, síðani Evropearar, ið ikki eru norðurlendingar, og seinast norðurlendingar. Viðmerkjast skal tó, at við summum skipabólkum eru sera fá ella ongi svar frá sjófólki, ið ikki eru føroyingar, og sostatt er torført at gera endaliga niðurstøðu, um upplivingarnar hjá sjófólki er knýtt at tjóðskapi sum heild, ella um tað er grundað á sosiala umhvørvið umborð á skipaslagnum.



## Óynsktar seksuellar viðmerkingar og kropsligt samband

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: óynsktar seksuellar viðmerkingar til kropp/ klæði ella annað" svaraðu 86,4 % av teimum teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 13.6 % upplivað óynsktar seksuellar viðmerkingar. 7.8 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 2.7 % svara onkuntíð, 1.9 % svara ofta og 1.2 % av teimum spurdu svara, at tey sera ofta fáa óynsktar seksuellar viðmerkingar til kropp/ klæði ella annað.




Hyggur ein at svarunum býtt eftir skipabólki, sæst, at sjófólk við øllum skipabólkum uppliva óynsktar seksuellar viðmerkingar, men meðan umleið 90 % av sjófólkum við annaðhvørt handilsskipum undir ella yvir 500 BT ongantíð uppliva hetta, er parturin av sjófólki við fiskiskipum, ið ikki hava upplivað hetta, minni. Umleið 81 % av sjófólkunum, ið sigla við antin fiskiskipum undir ella yvir 500 BT siga seg ongantíð hava upplivað óynsktar seksuellar viðmerkingar. Hyggur ein at, hvørjum skipabólki tey sjófólk, ið svara "sera ofta" ella "ofta" til spurningin, sigla við, siglir størsti parturin av teimum við fiskiskipum. Fyri fiskiskip yvir 500 BT, svara 2.5 % "sera ofta" og 3.8 % svara "ofta", meðan 4.5 % av teimum við fiskiskipum undir 500 BT, ofta móttaka óynsktar seksuellar viðmerkingar.



100,0%
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
0,0%
0,0%
2,5%
0,0%
0,8%
4,5%
3,8%
0,0%
0,8%
4,5%
1,3%
8,0%
2,5%
33,3%
9,1%
11,3%
0,0%
5,0%
66,7%
81,8%
81,3%
92,0%
90,9%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Hvørjum skipaslagi hevur...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Um ein hyggur at svarunum bólkað á aldursbólkar, kann úrslitið benda á, at ung sjófólk í størri mun enn eldri sjófólkini fáa óynsktar seksuellar viðmerkingar, og eru tað mest sjófólk undir 45, ið ofta ella sera ofta hava upplivað hetta. Tó vísir kanningin, at sjófólk millum 56 og 65 eisini fáa slíkar viðmerkingar, tó møguliga ikki eins ofta sum tey ungu.




Svarini frá kanningini vísa, at allir starvsbólkar uppliva óynsktar seksuellar viðmerkingar, men úrslitini kunnu benda á, at brúgvayvirmenn, ið ikki eru skiparar, og dekkarar uppliva hetta oftari, tí 5.9 % av nevndu brúgvayvirmonnum hava upplivað tað ofta, og 2 % av teimum uppliva tað sera ofta, meðan partarnir av dekkarum, ið uppliva tað ofta og sera ofta er telja báðir 2.4 %.


120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
95,3%
90,5%
88,5%
84,3%
83,3%
80,7%
16,7%
7,8%
7,7%
9,5%
9,6%
2,3%
5,9%
2,0%
2,4%
3,8%
4,8%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer

Hóast stóra óvissu í niðurstøðuni, kunnu úrslitini benda á, at konufólk fáa fleiri seksuellar viðmerkingar enn menn – tó at flestu kvinnurnar ongar fáa. Kanningin kann tó við vissu vísa, at sjófólk fáa óynsktar seksuellar viðmerkingar, og at tað ikki einans eru sjófólk av ávísum kyni.




Hyggur ein at, um sjófólkini, ið móttaka óynsktar seksuellar viðmerkingar, hava ávísan tjóðskap, kunnu vit síggja, at einans evropearar uppliva hetta, og í størstan mun og oftast føroyingar. Viðmerkjast skal tó, at við summum skipabólkum eru einans evropearar, ið hava svarað, og sostatt er torført at gera endaliga niðurstøðu, um sjófólk av øðrum tjóðskapi enn evropeiskum ikki fáa óynsktar seksuellar viðmerkingar, ella um tað heldur er knýtt at skipaslagnum.



Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: Óynskt fysisk kontakt við seksuellum undirtónum” svaraðu 90.7 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Sostatt eru nakað færri sjófólk, ið uppliva óynskta fysiska kontakt við seksuellum undirtónum enn sjófólk, ið hava upplivað óynsktar seksuella viðmerkingar, har 86.4 % ongantíð upplivdu hetta.

Av teimum spurdu hava 9.3 % upplivað óynskta fysiska kontakt við seksuellum undirtónum. 5.4 % av sjófólkunum svara, at tey sjáldan hava upplivað hetta, 2.3 % at tey onkuntíð upplivað hetta, 0.4 % at tey ofta hava upplivað tað, og 1.2 % at tey sera ofta hava upplivað tað.




Hyggur ein at, um tað eru ávísir bólkar av sjófólkunum, ið uppliva óynskta fysiska kontakt, bendir tað á, eins og við undanfarna spurningi, at yngri sjófólk, føroyingar, sjófólk, ið sigla við fiskiskipum, dekkarar og brúgvayvirmenn (skiparar undantiknir) í størri mun uppliva hetta. Her sæst tó eisini, at lutfalsliga stórur partur av skipskokkum, 4.7 %, uppliva hetta sera ofta.



120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á aldur
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Aldur / Age
16 - 25
26 - 35
36 - 45
46 - 55
56 - 65
66 - 75
4,8%
1,6%
7,4%
2,3%
3,6%
13,6%
6,5%
98,4%
100,0%




120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á tjóðskap
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Tjóðskapur /...
Føroyskur / Faroese
Norðurlendskur / Northern Europe
Annað land í Evropa / Other European country
Annað / Other
1,5%
0,5%
2,9%
6,4%
6,7%
88,7%
93,3%
100,0%
100,0%



120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
0,0%
4,5%
1,3%
0,0%
0,8%
0,0% 0,0%
1,3%
0,0% 0,0%
0,0% 0,0%
5,0%
8,0%
0,0%
11,1%
9,1%
8,8%
0,0%
3,3%
88,9%
86,4%
83,8%
92,0%
95,9%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Hyggur ein nærri at starvsbólkum, bendir tað á, at skiparar og maskinmenn í lítlan mun uppliva óynskta seksuella kontakt, meðan meiri enn 17 % av brúgvayvirmonnunum, undantikið skiparar, 12 % av dekkarum og 9.5 % av skipskokkum hava upplivað óynskta fysiska kontakt við seksuellum undirtónum.

Grundað á fá svar frá konufólki, verður ikki mett, at nakað kann sigast um stórvegis mun á kynunum í hesum svarunum, men tað sæst, at sjófólk av báðum kynum uppliva hetta.




120,00%
100,00%
80,00%
60,00%
40,00%
20,00%
0,00%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
97,67%
82,35%
96,15%
90,48%
100,00%
87,95%
11,76%
7,23%
4,76%
1,92%
3,61%
1,96%
1,20%

## Útihýsing

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: Tú ella onnur verða útihýst frá sosialum samanhangum umborð" svaraðu 66.1 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 33.9 % upplivað, at tey sjálvi ella onnur verða útihýst umborð. 17.9 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 10.1 % svara onkuntíð, 3.9 % svara ofta og 1.9 % svara sera ofta.




Lítil og eingin munur sást á skipabólkum og kyni, og verða hesar stabbamyndir tí ikki vístar her. Mett verður ei heldur, at stórvegis munur er á svarunum frá ymisku starvsbólkunum, tó at ein munur er serliga týðuligur – nevniliga at heili 86 % av skiparum siga seg ongantíð hava upplivað útihýsing seinastu 5 árini, meðan parturin av sjófólki í hinum starvsbólkunum, ið ongantíð hava upplivað tað, í minsta lagi er 19 prosentstig minni. Sostatt verður mett, at skiparar í mongum førum ikki vita, at útihýsingin um borð á skipunum fer fram, og halda sostatt støðuna vera betri, enn hon er.

Eisini kunnu tølini møguliga vísa, at tað eru størri líkindi fyri, at tú oftani upplivir útihýsan av tær ella øðrum, um tú ert brúgvayvirmaður ella maskinmaður.


Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
100,0%
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer
0,0%
3,9%
1,9%
0,0%
0,0%
2,4%
2,3%
3,9%
7,7%
0,0%
16,7%
2,4%
2,3%
13,7%
13,5%
9,5%
16,7%
9,6%
9,3%
17,6%
19,2%
28,6%
0,0%
20,5%
86,0%
60,8%
57,7%
61,9%
66,7%
65,1%

Hyggur ein at svarunum býtt eftir aldri, sýnist tað eins og yngri sjófólk hava størri sannlíkindi at verða útihýst ella vera vitni til útihýsing enn teirra eldri starvsfelagar.



## Harðskapur og hóttanir

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: harðskap ella hóttanir mótvegis øðrum" svaraðu 80.5 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 19.5 % upplivað, at onnur eru úti fyri harðskapi ella hóttanum umborð. 10.9 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 5.5 % svara onkuntíð, 2 % svara ofta og 1.2 % svara, at tey sera ofta uppliva, at onnur eru úti fyri harðskapi ella verða hótt.




Hyggur ein at býtinum millum skipabólkarnar sæst, at hóttanir og/ella harðskapur serliga fer fram umborð á fiskiskipum yvir 500 BT, har 2.5 % av teimum spurdu svara sera ofta til spurningin, meðan 5.1 % svara ofta og 67.1 % svara ongantíð.

Úrslitini kunnu benda á, at serliga brúgvayvirmenn, ið ikki eru skiparar, og dekkarar eru vitni til harðskap ella hóttanir av øðrum, hóast munurin millum starvsbólkarnir ikki er stórur. Stórur munur sæst tó aftur millum svarini hjá skiparum og aðrari manning, tí heili 93 % av skiparunum svara, at tey ongantíð hava upplivað harðskap móti øðrum seinastu 5 árini, meðan millum hinar starvsbólkarnar (undantikið juniormeistarar) í minsta lagi eru 10 prosentsstig færri, ið svara hetta.


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
100,0%
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
88,9%
88,4%
81,8%
80,0%
67,1%
16,5%
13,6%
11,1%
8,0%
7,4%
12,0%
8,9%
4,5%
2,5%
0,0%
5,1%
0,0%
0,0%
0,0%
0,8%
2,5%
0,0%
0,0%
0,0%
0,8%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í høvuðsheitum siglt...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
Procentpartur a sjófólki býtt á starv
100,0%
93,0%
82,7%
81,0%
76,8%
70,6%
17,6%
14,3%
12,2%
7,7%
4,7%
0,0%
9,6%
7,3%
3,9%
2,3%
0,0%
3,9%
4,8%
3,7%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: harðskap ella hóttanir móti tær” svaraðu 84.8 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 15.2 % upplivað harðskap og/ella hóttanir móti sær. 7 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 6.2 % svara onkuntíð, 1.2 % svara ofta og 0.8 % svara, at tey sera ofta eru úti fyri harðskapi og/ella hóttanum.




Hyggur ein at býtinum fyri hvønn skipabólk sæst, at sjófólk eru fyri harðskapi og/ella hóttanum í øllum skipabólkum, tó tað kann benda á, at møguleikin er størri fyri, at tú upplivir hetta, um tú siglir við fiskiskipi yvir 500 BT ella handilsskipi undir 500 BT.

Býtið millum ymsu starvsbólkarnar samsvarar við seinast umrødda spurning, og tískil verður hetta ikki greinað nærri.


100%
90%
80%
70%
60%
50%
40%
30%
20%
10%
0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
0% 0% 1% 0% 1%
0% 0% 3% 4% 0%
0% 9% 10% 8% 3%
11% 0% 10% 8% 6%
89% 91% 76% 80% 90%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í høvuðsheitum...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

## Greining av happingini

Niðanfyri síggjast úrslitini av spurninginum, ið ljóðar: “Um tú hevur upplivað at verða happað/ur ella chikanerað/ur umborð á føroyskt skrásettum skipum seinastu 5 árini, hvørjum var hetta viðvíkjandi: húðarliti, tjóðskapi, átrúnaði og trúgv, kyn, kynsliga sannføring, aldur, annað ella havi ikki upplivað hetta”. Møguleiki var fyri at velja fleiri møguleikar. Tey, ið hava valt “havi ikki upplivað hetta” men eisini onnur svar samstundis, vórðu bólkað undir “eg havi ikki upplivað hetta”. Mett verður, at tey munnu hava valt hini svarini, tí tey ikki sóu, at tað var møguligt at velja “havi ikki upplivað hetta” beinanvegin.

Stabbamyndin vísir, at 80.9 % av teimum spurdu ongantíð hava verið happað persónliga, og sostatt meta 19.1 % av sjófólki, ið hava siglt við føroyskum skipi seinastu 5 árini, at tey á einhvønn hátt eru vorðin happað ella chikanerað. 9.3 % eru vorðin happaði av ókendum orsøkum, 2.7 % við átrúnaði, 1.6 % við aldri, 1.2 % við tjóðskapi og minni enn 1 % nýttu einhvønn av írestandi møguleikunum ella fleiri møguleikum samstundis.




Spurt varð eisini, um sjófólkini høvdu upplivað at onnur vórðu happað ella chikanerað við støði í somu evnum. Til hetta svaraðu 71.2 %, at tey ongantíð høvdu upplivað happing ella chikanering av

øðrum umborð seinastu 5 árini.  14 % valdu møguleikan “annað”, 2.3 % “Átrúnað og trúgv”, 1.2 % “húðarlit” og “átrúnað” samlað, 1.2 % “tjóðskap” og 1.2 % “kynslig sannføring”. Tað vóru fleiri, ið valdu eina kombinatión av fleiri valmøguleikum, men hyggur ein eftir svarunum samlað, kann tað týða á, at serliga  átrúnaður og trúgv, húðarlitur og tjóðskapur eru afturvendandi, men eisini kyn og kynslig sannføring, ið samsvarar væl við svarini til fyrra spurningin.

Samanber ein hesa stabbamynd við ta omanfyri, er eisini áhugavert at síggja, at aldur ikki er eins nógv valt til tann seinna spurningin, sum til tann fyrra. Hetta kann vera ein ábending um, at ein ikki eins oftani gevur tí ans, at onnur áhaldandi vera argað ella øðrvísi viðfarin grundað á aldur. Hetta kann møguliga vera grundað á, at minni fokus er á aldursmismuni í samfelagnum samanborið við mismun á fólki grundað á átrúnað, tjóðskap, húðarlit ella kyn.



## Ávirkanir

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: kennir teg bangnan fyri starvsfelagum ella leiðslu umborð” svaraðu 83.7 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 16.3 % roynt at verið bangin fyri síni leiðslu ella starvsfelagum. 7.8 % svara, at tey uppliva hetta sjáldan, 3.9 % svara onkuntíð, 1.9 % svara ofta og 2.7 % svara, at tey sera ofta eru bangin.




Verður hugt at, um munur er á ymsum skipabólkum, kann okkurt benda á, at tað er størri møguleiki fyri, at tú ert bangin, um tú siglir við fiskiskipi undir 500 BT, enn um tú siglir við øðrum skipum. Um ein samanber svarini til henda spurning við undanfarnar spurningar í hesum kapitli, er áhugavert at síggja, at hóast sjófólk við hesum skipabólki boða frá minni harðskapi enn summir aðrir skipabólkar, eru tað heili 13.6 % av spurdu sjófólkunum, ið siga seg sera ofta vera bangin. Sjófólk við hesum skipabólki siga seg tó lutfalsliga ofta hava upplivað óynskta fysiska kontakt við seksuellum undirtónum, óynsktar seksuella viðmerkingar, niðrandi orð og baktalu ella slatur. Millum annað av hesum, verður mett, at gerandisliga orðaskifti skal takast í stórum álvara, og ikki einans beinleiðis harðskapur, hóttanir og sexchikana.

Mett verður ikki, at stórvegis munur er millum starvsbólkarnar, og tí verður tað ikki viðgjørt her, men nevnast skal, at tølini vísa, at skiparar í størri mun enn restin av manningini svarar “ongantíð” til

spurningin. Mett verður ikki, at serligur munur kann síggjast á aldursbólkum, kyn og tjóðskapi, tó nevnast kann, at einans føroyingar oftani eru bangnir.


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
100,0%
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Svar
0,0%
13,6%
1,3%
4,0%
1,7%
0,0%
0,0%
3,8%
0,0%
1,7%
11,1%
9,1%
2,5%
4,0%
3,3%
0,0%
4,5%
7,5%
4,0%
9,9%
88,9%
72,7%
85,0%
88,0%
83,5%
Hvørjum skipaslagi hevur tú í høvuðsheitum...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: svøvnloysi vegna sosiala umhvørvið umborð” svaraðu 76.3 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 23.7 % mist svøvn grundað á sosiala umhvørvið umborð. 12.8 % svara, at tað hendir sjáldan, 6.6 % svara onkuntíð, 1.6 % svara ofta og 2.7 % svara, at tey sera ofta missa svøvn. Mett verður, at óvist er, hvussu tey spurdu hava skilt spurningin, tí tað verður ikki spurt, um tey missa svøvn grundað á eitt ringt sosialt umhvørvi ella av øðrum minni neiligum orsøkum. Tó verður mett, at svøvnloysi í flestu førum verður skilt sum eitt neiligt fyribrigdi, og samsvara svarprosentini rímiliga væl við lutfalli av sjófólki, ið hava ringar upplivingar av sosiala umhvørvinum umborð.

Meðan eitt ringt sosialt arbeiðsumhvørvi í sjálvum sær altíð skal takast í álvara, skal svøvnloysi sum fylgisárin eisini takast í stórum álvara. Svøvnloysi kann hava beinleiðis ávirkan á trygdina umborð, eftirsum at fleiri feilir kunnu koma fyri grundað á møði. Til hetta skal leggjast afturat, at stórur partur av orsøkunum til, at skip renna á land, koma av, at vakthavandi navigatørurin sovnar.




Verður hugt at býtinum á ymsu skipabólkum sæst, at tað er størri møguleiki at missa svøvn umborð á fiskiskipum, ið eisini eru tey skip, har sannlíkindini eru størri fyri at hava neiligar upplivingar. Verður hugt at starvsbýtinum, sæst, at allir starvsbólkar uppliva svøvnloysi, men eru tað møguliga oftari brúgvayvirmenn, ið ikki eru skiparar, og dekkarar, har umleið 70 % ongantíð uppliva hetta.


Procentpartur av sjófólki bytt á skipabólk
120,0%
100,0%
80,0%
60,0%
40,0%
20,0%
0,0%
100,0%
84,0%
81,0%
67,5%
63,6%
18,2%
18,8%
12,4%
9,1%
4,5%
5,0%
1,7%
4,5%
4,0%
1,3%
0,8%
7,5%
8,0%
4,1%
4,0%
0,0%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


100,0%
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
0,0%
3,9%
1,9%
4,8%
0,0%
3,6%
0,0%
2,0%
3,8%
0,0%
0,0%
1,2%
4,7%
5,9%
5,8%
0,0%
0,0%
10,8%
7,0%
17,6%
7,7%
9,5%
50,0%
14,5%
88,4%
70,6%
80,8%
85,7%
50,0%
69,9%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu ofta hevur tú upplivað fylgjandi: skerdan áhuga í at arbeiða vegna sosiala umhvørvið umborð” svaraðu 71.8 % av teimum spurdu, at tey ongantíð hava upplivað hetta seinastu 5 árini. Av teimum spurdu sjófólkunum hava sostatt 28.2 % havt skerdan áhuga at arbeiða av hesum. 13.3 % svara, at tey uppliva tað sjáldan, 7.5 % svara onkuntíð, 4.7 % svara ofta og 2.7 % svara, at tey sera ofta hava skerdan hug at arbeiða av sosiala umhvørvinum.




Úrslitini vísa, at partar av sjófólki við øllum skipabólkum hava skerdan áhuga at arbeiða grundað á sosiala arbeiðsumhvørvið, tó at tað møguliga eru nakað færri sjófólk umborð á handilsskipum undir 500 BT, ið meta tað. Verður hugt at svarunum frá aldursbólkunum, kunnu tey benda á, at serliga yngru ættarliðini kenna skerdan áhuga at arbeiða grundað á sosiala arbeiðsumhvørvið umborð.




Um sjófólk hava skerdan áhuga at starvast umborð á føroyskum skipum grundað á sosiala arbeiðsumhvørvið, kann tað skeikla kappingarførið hjá føroyskum skipum til at fáa arbeiðsmegi. Samstundis er tað serliga viðkomandi, at serliga ung, ið meiri sannlíkt skifta størv enn eldri starvsfólk, kenna skerdan áhuga at arbeiða umborð á føroyskum skipum.

Í kanningini spurdi Sjóvinnustýrið, um sjófólk enn sigldu við føroyskum skipi, og um svarið var nei, varð spurt, um tey kundu greiða frá, hví so var. Í flestu førum var orsøkin, at tey vóru farin í skúla, at lønin ikki var góð nokk, tey høvdu fingið kjans við útlendskum skipi, at tað var grundað familjulív og/ella at tey høvdu fingið betri møguleikar á landi. Tó svaraðu summi sjófólk eisini, at tey vóru givin grundað á happing, seksuellan ágang ella generelt ringa sálarliga heilsu. Sostatt eru dømi um, at sjófólk gevast at sigla sum úrslit av sosiala umhvørvinum og ringari sálarligari heilsu. Hetta er við til at staðfesta týdningin av at raðfesta sosial viðurskifti umborð á skipum.



Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
90,0%
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
0,0%
0,0%
5,1%
0,0%
2,5%
0,0%
9,1%
5,1%
8,0%
3,3%
0,0%
18,2%
7,6%
8,0%
5,8%
22,2%
4,5%
16,5%
0,0%
15,0%
77,8%
68,2%
65,8%
84,0%
73,3%
Sera ofta / Very often
Ofta / Often
Onkuntíð / Sometimes
Sjáldan / Rarely
Ongantíð / Never
Týttleiki
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

## Fyrr, nú og framtíðin

Av tí at ongar kanningar eru gjørdar av hesum slagi fyrr, ber ikki til at samanbera úrslitini frá hesi kanning við eldri úrslit fyri at vita, um sosiala umhvørvið um borð á skipum batnar, versnar ella stendur í stað. Tískil hava vit sett soljóðandi spurning til sjófólkini, fyri at fáa teirra meting av gongdini: "Um tú hevur siglt í meira enn 5 ár, metir tú at happing og/ella chikana er ein vaksandi ella minkandi trupulleiki umborð á føroyskum skipum?". Til hetta siga 32.4 % seg ikki vita, 39.2 % meta, at trupulleikin minkar, 22.4 % meta hann vera óbroyttan og 6 % svara, at tað er ein vaksandi trupulleiki. Sostatt meta tey flestu, ið hava mett um støðuna, at happing og/ella chikana er ein minkandi trupulleiki á føroyskum skipum, ella at hann hóast alt ikki versnar.




Vit hava hugt at, hvussu býtið viðvíkjandi skipabólki er millum tey, ið hava tikið støðu til spurningin fyri at síggja, um munur er á tendensinum á ymsu skipabólkunum. Tey, ið hava svarað "eg veit ikki" eru skild frá fyri týðiligari at síggja munin millum skipabólkarnar. Úrslitini kunnu benda á, at tað er størri møguleiki fyri, at tú heldur, at trupulleikin er vaksandi, um tú siglir við handilsskipi undir 500 BT enn øðrum skipabólkum. Eisini sæst, at av sjófólki við fiskiskipum, ið annars siga seg hava upplivað lutfalsliga nógvan særandi atburð, er ein stórur partur, ið metir, at happing og/ella chikana er minkandi. Í flestu førum er sostatt talan um eina jaliga gongd, men er enn brúk fyri stórum bata av viðurskiftunum umborð.



70,00%
60,00%
50,00%
40,00%
30,00%
20,00%
10,00%
0,00%
Procentpartur av sjófólki, ið sigla við føroyskum skipi
66,67%
61,02%
59,49%
50,00%
33,33%
46,67%
33,33%
30,51%
32,91%
25,00%
25,00%
20,00%
8,47%
7,59%
0,00%
Minkandi / Diminishing
Hvørki ella / Neither
Vaksandi / Growing
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

## Niðurstøða – happing, diskriminatión og meira

Kanningin vísir, at hóast stórur partur av sjófólkum á føroyskum skipum eru nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið, finst átaluverdur atburður umborð á øllum skipabólkum. Munur sæst tó eisini á svarum frá ymisku skipabólkunum og ávísum bólkum av sjófólkum.

Sum heild kann sigast, at tað er ein ov stórur partur av sjófólki, ið upplivir neiligan atburð. Kanningin vísir nevniliga, at 72 % av sjófólki hava upplivað baktalu ella slatur um seg ella starvsfelagar umborð, helvtin av sjófólkunum hava upplivað, at niðrandi orð verða søgd, 33.9 % uppliva útihýsing av sær ella øðrum, meiri enn ein fjórðingur av sjófólkunum uppliva, at sjófólk verða argað við kyni, húðarliti, tjóðskapi ella religión, 19.1 % hava persónliga verðið happað ella chikanerað umborð, 28.8 % hava sæð onnur verið happað ella chikanerað, umleið ein fjórðingur upplivir óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd, 13.7 % uppliva óynsktar seksuellar viðmerkingar, 9.3 % uppliva óynskta fysiska kontakt við seksuellum undirtónum, og 19.5 % uppliva harðskap ella hóttanir móti øðrum og 15.2 % móti sær sjálvum.

Nevnast skal, at av teimum, ið uppliva tílíkan atburð, upplivir meginparturin tað sjáldan – men eru eisini minni ella størri partar av sjófólkum, ið oftari hava neiligar upplivingar.

Úrslitini vísa harafturat, at møguleikin fyri at uppliva omanfyrinevnda er sum heild størri umborð á fiskiskipum enn umborð á handilsskipum. Tað er einans viðvíkjandi útihýsing, at eingin stórvegis munur sæst millum skipabólkarnar, og viðvíkjandi harðskapi móti sær sjálvum bendir kanningin á, at møguleikin er størri at uppliva hetta umborð á fiskiskipum yvir 500 BT og á handilsskipum undir 500 BT.

Verða svarini býtt upp eftir tjóðskapi, eru svarini oftani meiri neilig frá evropearum, og serliga føroyingum. Ivasamt er tó, um hetta skyldast skipaslagið, sum siglt verður við, heldur enn mentanarmunum og uppfatanum ella atburð mótvegis ávísum tjóðskapum.

Har svarini eru býtt eftir kyni sæst, at sjófólk av báðum kynum hava neiligar upplivingar, og meðan tað ikki er stórvegis munur millum kynini viðvíkjandi spurningum um útihýsing og óynskta fysiska kontakt við seksuellum undirtónum, uppliva kvinnur møguliga oftari enn menn óynsktar seksuellar viðmerkingar, baktalu og slatur og arging av sær ella øðrum við kyni, húðarliti, tjóðskapi ella religión. Tølini skulu takast við fyrivarni grundað á fá svar frá konufólkum, men kunnu tølini benda á, at sosiala arbeiðsumhvørvið á summum økjum má betrast fyri at geva rúm fyri kvinnuligum sjófólkum. Tølini vísa í øllum førum, at sjóneykan má setast á óynsktan seksuellan atburð í sjóvinnuni, ið bæði

mannfólk og konufólk uppliva. Hetta vísir eisini, at atlit má ikki einans takast til seksuellan ágang, har kynini møtast, men eisini á starvsplássum, har einans mannfólk ella konufólk arbeiða.

Tá svarini verða býtt upp eftir starvi sæst, at skiparin í stóran mun ikki upplivir neiligan atburð umborð samanborið við aðrar starvsbólkar. Tað kann benda á, at skiparin kann hava heilt øðrvísi fatan av sosiala arbeiðsumhvørvinum umborð og kann soleiðis ikki traðka til, tá trupulleikar skulu loysast á hægri stigi. Harafturat bendir kanningin á, at serliga stýrimenn oftari hava neiligar upplivingar við t.d. arging, útihýsing, óynsktum viðmerkingum og fysiskari kontakt við seksuellum undirtónum og harðskapi ella hóttanum. Eisini dekkarar og maskinmenn uppliva oftani summi av hesum viðurskiftum, har lutfalsliga nógvir dekkarar uppliva óynsktan seksuellan atburð og harðskap, og maskinmenn eins og brúgvayvirmenn uppliva útihýsing og óynsktar viðmerkingar um kropp og útsjónd.

Tá ið spurt varð, hvat fólk søgdu seg ella onnur verða happaði við, valdi nógv størsti parturin møguleikan "annað", men annars vóru átrúnaður, tjóðskapur, húðarlitur og kyn ella kynslig sannføring afturvendandi. Aldur var meiri vanligt svar, tá spurt var um persónliga happing heldur enn happing av øðrum, og mett verður, at orsøkin kann vera, at tað er minni sjónligt enn, tá happing gerst t.d. rasistisk, sexistisk ella homofobisk. Sum nevnt var eisini "annað" stórur partur av svarunum, og verður tí mett, at meðan diskriminatión av nøkrum slag ikki skal koma fyri, má ein meiri yvirskipaður boðskapur eisini vera, um at eingin happing verður góðtikin umborð.

Neiligu sosialu viðurskiftini omanfyri kunnu hava ávirkan á mentalu heilsuna hjá sjófólkunum, og 16.3 % av sjófólkunum siga í hesum sambandi, at tey hava verið bangin fyri starvsfelagum ella leiðslu sínari. Møguleikin er størri fyri hesum, um tú ert umborð á fiskiskipum undir 500 BT, og um tú ikki ert skipari. Harðskapur ella hóttanir umborð eru ikki avgerandi fyri, um sjófólkini kenna seg bangin, og kunnu úrslitini benda á, at eitt neiligt samskifti umborð við til dømis niðrandi orðingum, baktalu og slatri eisini samlað kunnu gera sítt til, at sjófólk kenna seg bangin fyri starvsfelagum ella leiðslu.

Eisini svara 23.7 %, at tey missa svøvn vegna sosiala arbeiðsumhvørvið. Tað sýnist at vera samanhangur millum neiligar upplivingar og svøvnloysi, eftirsum at tað er størri møguleiki fyri báðum umborð á fiskiskipum. Tað eru møguliga fleiri brúgvayvirmenn (ikki skiparar) og dekkarar, enn aðrir starvsbólkar, ið siga frá oftari ella sjáldnari svøvnloysi. Hetta er sera álvarsamt, tí svøvnloysi kann fáa fylgir fyri bæði likamliga og sálarliga heilsu hjá fólkunum, men eisini ávirka samlaðu trygdina umborð.

Kanningin vísir eisini, at sosiala arbeiðsumhvørvið kann fáa ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum skipum, tí 28.2 % siga frá skerdum áhuga í at arbeiða vegna sosiala arbeiðsumhvørvið. 13.3 % svara, at hetta er sjáldan, men tað eru næstan 15 %, sum sostatt kenna hetta oftari. Hetta er galdandi umborð á øllum skipabólkum, men møguliga serliga handilsskipum undir 500 BT, og er tað serliga galdandi millum yngri sjófólk (undir 45 ár). Hetta kann eisini hanga saman við úrslitunum, ið vísa, at yngri sjófólk í størri mun enn eldri sjófólk siga seg hava haft neiligar upplivingar. Konkret hava sjófólk givið til kennar, at tey ikki longur sigla við føroyskum skipi vegna ringa sálarliga heilsu og sosiala umhvørvið umborð.

Fyri trivnað og heilsu hjá sjófólki og framtíðini við rekruttering til føroyska flotan er sostatt neyðugt at taka sosial viðurskifti í álvara á sama hátt sum teknisk viðurskifti og løn.

Samstundis vísir kanningin, at flestu sjófólkini sum heild meta, at happing umborð á skipum er minkandi, men tiltøk mugu setast í verk fyri at skumpa broytingina frameftir og betra um viðurskiftini hjá sjófólkunum, ið sigla við føroyskum skipum beint nú.

## Leiklutur hjá leiðslu umborð og á landi

Á landi og á sjógvi kann leiðslan á starvsplássinum hava avgerandi týdning fyri, um starvsfólkini trívast. Hetta verður eisini víst til av sjófólki í kanningini við hesi orðing: "*Nú er tað annað upp á, hvør skiparin er. Annar skiparin er av fittastu monnum, og alt koyrir bara umborð, og hin skiparin dugur ikki fáast við fólk yvirhøvur, og moralurin umborð fer í botn mest sum beinanveg, man hevur loyst frá kaj*". Sostatt kann tað hava týdning at kanna samspæl millum skipara og manning, fyri at meta, um tiltøk kunnu setast í verk her.

Umborð á skipi er skiparin ovasta leiðsla, men eru vanliga fleiri millumlið, soleiðis at t.d. maskinstjórin er tættasti leiðari hjá juniormeistaranum, tó at skiparin er ovasta leiðsla við evstu ábyrgd. Happing og líknandi verður vanliga fráboðað til tættasta leiðara, sum síðani ber boðini víðari til næsta lið í hierarkinum. Skiparin kann síðani ber boð víðari til reiðaríið á landi. Sjóvinnustýrið hevur spurt, um sjófólk vita, hvussu happing og chikana skal fráboðast, og teirra meting av handfaringini hjá leiðsluni umborð í at forða fyri tílíkum. Eisini vórðu spurningar settir, ið kunnu geva ábendingar, um sjófólkið kennir seg hava sjálvsavgerðarrætt, stuðul frá síni leiðslu (ovastu ella tættastu leiðslu), og at leiðslan fremur eins viðferð av sjófólkum umborð.

## Týdningur av samskifti umborð og leiðslunnar ávirkan

Í kapitlinum "Sosialt umhvørvi og sambond umborð" varð greinað, hvussu trivnaður umborð sum heild sýnist at vera. Nevnt var, at ábendingar eru um, at størsti parturin av sjófólkunum vóru nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið og mettu, at tað var stuðlandi (umleið 70 %), meðan nakað færri mettu, at sosiala arbeiðsumhvørvið var inkluderandi (62.5 %). Hóast stórur partur av sjófólkum sum heild vístu nøgdsemi við arbeiðsumhvørvið, lýstu sjófólk umborð á handilsskipum sum heild eitt jaligari arbeiðsumhvørvi enn sjófólk umborð á fiskiskipum, serliga fiskiskipum undir 500 BT. Harafturat var víst á, at har kann vera munur á, hvussu sjófólk í ávísum aldursbólkum ella av ymsum tjóðskapi uppliva arbeiðsumhvørvið. Út frá omanfyristandandi verður mett, at leiðslan hevur megnað at skapað og/ ella viðlíkahildið trivnað umborð, men tað kann vera ein avbjóðing hjá skiparanum at skapa eitt umhvørvi, ið passar til manning av ymiskum aldri, bakgrund, kyni, útbúgving ella persónleika sum heild.

Soleiðis skrivar ein skipskokkur um trupulleikan við mongum mentanum, ið ávirkar sosiala umhvørvið: "*Í sambandi við vaksandi manningartal við útlendingum, er tað ikki so lætt at halda tað*

*sosiala við líka. Mentanarmunurin er alt ov stórur og verður ikki gjørt nógv burtur úr at sameina mentanirnar umborð*." Her kann hugsast, at kannað verður, um skiparar hava røttu amboðini at virka í eini broyttari tíð, har manningin er fevnd av ymiskleika heldur enn homogeniteti.

Sambært kanningum í trivnaði umborð á skipum sambært "Social Interaction Matters (SIM) Project Report Phase Two – Executive Summary" eftir Dr. Kate Pike, er tað sera týdningarmikið, at hava sosialisering saman við eini klárari leiðslu umborð á skipi. Umborð á skipum er oftani stór útskifting av sjófólki, og tí hevur tað týdning, at sosialisering er fastur partur av frítíðini umborð, og at leiðarar geva greið boð um, hvat verður væntað av manningini. Hetta skapar tryggleika í einum annars oftani skiftandi umhvørvi.

Til at kanna, um sjófólk umborð á føroyskum skipum hava eina greiða leiðslu, var fylgjandi spurningur settur: "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Mín leiðari gevur mær leypandi feedback fyri mítt arbeiði". Til hetta vóru 15.6 % sera samd, 38.3 % samd, 27.7 % hvørki samd ella ósamd, 12.1 % ikki samd og 6.3 % als ikki samd.




Sostatt fær umleið helvtin av teimum spurdu leypandi feedback fyri sítt arbeiði, meðan onnur als ikki fáa hetta ella ikki ofta. Verður hugt at, um munur er á skipabólkunum, sæst, at tað serliga er umborð á stórum handilsskipum, at sjófólkini móttaka leypandi feedback (60 %), meðan hetta sjáldan verður nýtt á smærri fiskiskipum (36.4 % uppliva hetta). Á stórum fiskiskipum og handilsskipum undir 500

BT samsvarar tendensurin væl við samlaða svarbólkin, har umleið helvtin móttekur leypandi feedback.

Tað tykist sum teir skipabólkar, ið nýta leypandi feedback, eisini eru teir, har nøgdsemi umborð er betri, og umvent, at har hetta ikki verður nýtt eins nógv, er nøgdsemi verri. Torført er at siga, um hesi hava ávirkan á hvørt annað, men tað kann møguliga tala fyri, at leiðarar í størri mun nýta leypandi feedback ella aðra greiða kommunikatión til at tryggja gott samskifti millum manningina umborð.

Verður hugt at svarunum býtt eftir aldursbólki, er tað áhugavert at síggja, at tað møguliga serliga eru sjófólk yvir 56 ár, ið siga seg fáa leypandi feedback. Hetta skuldi tó verið roynd sjófólk, har ein kundi hugsa, at feedback í nógvum førum ikki varð mett neyðugt í arbeiðinum grundað á førleikarnar, ið sjófólkið hevur. Verður hugt at øðrum aldursbólkum, eru umleið helvtin, ið fær leypandi feedback. Tó vilja vit vísa á, at av teimum 16-25 ára gomlu eru 3.7 % sera ósamd í, at tey fáa leypandi feedback, meðan 11.1 % hava svarað “ikki samd”. Av teimum millum 26-35 ár hava 11.4 % svara “als ikki samd” og 18.2 % “ikki samd”. Her er talan um nýggjastu og sostatt møguliga sjófólkini við fæst royndum. Mett verður, at serliga hesin aldursbólkur hevur brúk fyri leypandi feedback, bæði fyri at kunna mennast í arbeiðinum og fyri at kunna trívast í tí starvsleið, tey hava valt.

Vísast skal á, at feedback í øllum førum ikki hevur jaliga ávirkan, t.d. um hetta kann kennast sum “micro-managing”. Tó so at verður feedback givið konstruktivt og við greiðum samskifti, kann tað stuðla undir samskifti umborð eins væl og tryggleikan og fakligu menningina hjá starvsfólkunum í teirra arbeiði. Mett verður, at leypandi feedback kann við fyrimuni verða nýtt umborð fyri at skapa betri samskifti sosialt, men eisini í arbeiðinum sum heild.



Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
55,6%
42,5%
37,5%
36,0%
30,0%
28,0%
27,3%
23,8%
22,7%
22,7%
22,2%
18,2%
17,5%
17,5%
16,0%
15,0%
12,0%
11,1%
11,1%
9,1%
8,0%
6,3%
6,7%
3,3%
0,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT



60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á aldur
3,7%
11,4%
8,1%
4,8%
1,8%
16,7%
11,1%
18,2%
12,9%
11,3%
9,1%
0,0%
29,6%
18,2%
27,4%
35,5%
29,1%
0,0%
44,4%
29,5%
37,1%
37,1%
45,5%
33,3%
11,1%
22,7%
14,5%
11,3%
14,5%
50,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Aldur / Age
16 - 25
26 - 35
36 - 45
46 - 55
56 - 65
66 - 75

Fyri at kanna, um sjófólkini munnu kenna seg hava ávísan sjálvsavgerðarrætt í sínum arbeiði, varð spurt: “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg havi ávirkan á avgerðir, sum viðvíkja mínum arbeiðsuppgávum”. Til hetta vóru 27.3 % av teimum spurdu sera samd, 51.6 % samd, 10.9 % hvørki ella, 7 % ikki samd og 3.1 % als ikki samd. Sostatt meta fleiri enn 3 fjórðingar seg hava ávirkan á sínar arbeiðsuppgávur, meðan 10 % ikki meta seg hava hesa ávirkan.




Sambært gransking hjá Det Nationale Forskningscenter for Arbejdsmiljø er tað týdningarmikið fyri trivnaðin hjá starvsfólkum at kenna seg hoyrd og hava ávirkan, og vandi er fyri sjúkrafráveru, um ein ikki kennir seg hoyrdan. Sostatt er tað eitt gott tekin, at nógv kenna seg hava ávirkan, og hóast stórur partur, sum nevnt omanfyri, fáa leypandi feedback í arbeiðinum, sýnist tað ikki at ganga út yvir teirra kenslu av ávirkan.

Verður hugt at, um tað er munur millum ymsar skipabólkar, kann tað týða á, at serliga skipskokkar, skiparar og maskinmenn kenna seg hava ávirkan á egnar arbeiðsuppgávur, meðan tað eru lutfalsliga fleiri dekkarar ella brúgvayvirmenn, ið ikki kenna seg hava ávirkan. Tað er sera áhugavert at síggja, at 2.3 % av skiparunum, hægsti myndugleiki umborð, ikki kenna seg hava ávirkan á arbeiðsuppgávur og 9.3 % svara “hvørki ella”. Hetta kann møguliga grundgevast við, hvussu nógv arbeiðsøkið verður stýrt frá landi og/ ella av pappírskrøvum frá nationalum og altjóða myndugleikum.



70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
7,8%
4,8%
0,0% 0,0%0,0%0,0%
7,8%
12,0%
2,3%
3,8%
4,8%
0,0%
16,7%
13,5%
11,8%
9,3%
12,0%
0,0%
66,7%
57,8%
50,0%
46,5%
46,2%
45,1%
41,9%
36,5%
33,3%
28,6%
27,5%
13,3%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Viðvíkjandi muni millum skipabólkarnar sæst aftur, at serliga umborð á fiskiskipum undir 500 BT eru ábendingar um neiligt samskifti millum sjófólk og leiðara umborð – heili 27.3 % eru ikki samd í, at tey hava ávirkan, meðan 9.1 % eru sera ósamd í tí sama. Besti úrslitini fær tó hin fiskiskipabólkurin, har 85 % av teimum spurdu kenna seg hava ávirkan á arbeiðsuppgávurnar, meðan handilsskipini eru nakað niðanfyri við millum 76 og 81 %, ið kenna seg hava ávirkan. Ein grundgeving fyri, hví sjófólkini á handilsskipum kenna seg hava nakað minni ávirkan, kann, sum við skiparanum, vera fleiri myndugleikakrøv – tó skora hesi eisini høgt hóast høgu myndugleikakrøvini, serliga á stórum handilsskipum.


60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
55,0% 55,0%
44,0%
44,4%
36,4%
33,3%
32,0%
30,0%
27,3%
25,8%
16,0%
13,6%
11,1%
10,8%
9,1%
8,8%
8,0%
5,0%
3,8%
3,3%
2,5%
0,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Fyrr í hesi frágreiðing varð greitt frá, at færri enn 20 % av teimum, ið hava svara kanningini, ikki kendu seg trygg at tosa við síns leiðslu umborð um persónligar trupulleikar, meðan meiri enn helvtin kendu seg trygg við hetta. Eisini vóru tað fleiri, ið kendu seg trygg við at tosa við leiðsluna um persónligar trupulleikar, enn at tosa við starvsfelagar sum heild um hetta. Mett varð, at talan sum heild er um eitt gott samskifti umborð, og serliga við leiðsluna.

Hyggur ein at svarunum til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg kenni meg tryggan at tala at, um eg ella onnur eru úti fyri happing ella chikanu umborð", sæst harafturat, at 29.3 % vóru sera samd, 44.1 % vóru samd, 14.1 % svaraðu hvørki ella, 5.9 % vóru ósamd og 6.6 % sera ósamd.




Sostatt meta næstan tríggir fjórðingar av sjófólkunum, at tey kenna seg trygg at tala at, um tey sjálvi ella onnur eru úti fyri happing.

Verður hugt at, um ávísur starvsbólkur kennir seg tryggari at tala at, sýnist tað ikki eins og stórvegis munur er millum starvsbólkarnar sum heild, men møguliga skiparar kenna seg meiri tryggar at tala at enn aðrir starvsbólkar, har umleið 80 % av skiparum eru samdir ella sera samdir við útsøgnina. Viðvíkjandi skiparunum er tað áhugavert at síggja, at 7 % als ikki kenna seg tryggar at tala at móti happing og chikanu. Tað verður mett sum sera óheppið, eftirsum at skiparin er ovasta leiðsla umborð og tískil kann hava stóra ávirkan á, hvørt tílíkur atburður steðgar ella heldur fram. Hetta talar fyri, at góð upplæring í leiðslu, samskifti og handfaring av happing og chikanu er neyðug, soleiðis at

skiparararnir eru væl ílatnir til at leiða umborð og kenna seg tryggar at átala skeivan atburð umborð, bæði innan arbeiði og sosialt.


Procentpartur av sjófólki býtt á starv
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
7,0%
5,9%
5,8%
4,8%
0,0%
8,4%
0,0%
9,8%
7,7%
4,8%
16,7%
4,8%
11,6%
11,8%
19,2%
14,3%
0,0%
14,5%
37,2%
41,2%
36,5%
57,1%
66,7%
49,4%
44,2%
31,4%
30,8%
19,0%
16,7%
22,9%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer


60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
55,6%
45,5%
43,8%
45,8%
32,0%
33,3%
28,8%
28,0%
22,2%
13,6%
18,2%
16,0%
11,1%
6,3%
2,5%
7,5%
4,5%
5,8%
4,0%
0,0%
20,0%
18,2%
13,8%
12,5%
11,1%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í høvuðsheitum...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Verður hugt at muni millum skipabólkarnar, kann tað týða á, at tað eru færri sjófólk umborð á skipum undir 500 BT, ið kenna seg trygg at tala at, enn umborð á størri skipum. Hetta kann týða á, at tað er verri at tala at, umborð á smærri skipum, ið oftani hevur minni manning, og ein sostatt er bangin fyri at “oyðileggja tann góða stemningin”, sum ein kann taka til. Fyri fiskiskip undir 500 BT kundi ein frágreiðing verið, at happing oftari er partur av felagsskapinum, og tískil er ringt at tala at. Tó sæst hesin samanhangur ikki umborð á fiskiskipum yvir 500 BT, har ábendingar eisini er um meiri happing enn við handilsskipum, men tað eru lutfalsliga fá, ið ikki kenna seg trygg at tala at. Sostatt verður ikki mett, at ein felagsskapur, har happing ella annar neiligur sosialur atburður er vanligari, kann einsamalt grundgeva fyri, hví ein kennir seg ótryggan at tala at.

Fyrr í kapitlinum varð nevnt, at leypandi feedback og tað, at sjófólk hava ávirkan á egnar arbeiðsuppgávur, kann vera tekin um gott samskifti, har fólk verða sædd og hoyrd, og verður mett, at í tílíkum sosialum umhvørvi, kann tað kennast lættari at tala at. Hetta tykist í ávísan mun at samsvara við svarini, har sjófólk við skipum undir 500 BT í minni mun kenna seg hava ávirkan og somuleiðis ikki meta, at tey kunnu tala at. Eisini meta sjófólk við stórum fiskiskipum, at tey í stóran mun hava ávirkan á egnar arbeiðsuppgávur. Sostatt kann tað benda á, at ein kensla av, at hava ávirkan á egnar arbeiðsuppgávur, kann hanga saman við eini kenslu av, um ein kann tala at, tá ið ein sær neiligan atburð. Samstundis skal nevnast, at hesin samanhangur í minni mun sæst viðvíkjandi feedback, tí stórur partur av sjófólkum við skipum undir 500 BT, men eisini fiskiskipum yvir 500 BT fáa ikki leypandi feedback, men hetta sýnist ikki at ávirka sjófólkini umborð á stórum fiskiskipum til ikki at tala at, um neyðugt. Sostatt er tað ikki leypandi feedback sum er avgerandi, men møguliga aðrir hættir at vísa sjófólki, at opið samskifti er týdningarmikið. Mett verður, at hetta kann koma av, at feedback verður stýrt omanífrá, og loyvir ikki neyðturviliga samskifti báðar vegir, meðan ein kensla av, at hava ávirkan á arbeiðsuppgávur í størri mun kann smitta yvir á, at ein kann hava ávirkan á sosialu viðurskiftini umborð eisini.

Hyggur ein at muninum millum aldursbólkar og tjóðskapir, kann tað týða á, at tað í størri mun eru sjófólk av øðrum uppruna enn norðurevropeiskum og yngri sjófólk, ið ikki kenna seg trygg at tala at. Hetta talar fyri, at serligt atlit skal takast til yngri sjófólk og sjófólkum av øðrum uppruna enn føroyskum, ið møguliga ikki siga frá, um tey uppliva keðiligan atburð mótvegis sær. Tó skal nevnast, at eisini føroyingar kenna seg ótryggar at tala at.



Procentpartur av sjófólki býtt á tjóðskap
80,0%
70,0%
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
6,9%
0,0%
13,3%
7,1%
6,4%
0,0%
0,0%
14,3%
16,3%
8,3%
6,7%
0,0%
42,9%
41,7%
40,0%
71,4%
27,6%
50,0%
40,0%
7,1%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Tjóðskapur /...
Føroyskur / Faroese
Norðurlendskur / Northern Europe
Annað land í Evropa / Other European country
Annað / Other


Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
0,0%
9,1%
2,5%
0,0%
3,3%
11,1%
27,3%
3,8%
8,0%
5,0%
11,1%
13,6%
8,8%
16,0%
10,8%
33,3%
36,4%
55,0%
44,0%
55,0%
44,4%
13,6%
30,0%
32,0%
25,8%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

## Leiðslunnar leiklutur at forða fyri happing og líknandi

Sum nevnt á s. 42 viðvíkjandi spurningi, um sjófólk hava upplivað arging av sær ella øðrum vegna kyn, húðarlit, tjóðskap ella religión, varð víst á frágreiðing frá sjófólki um, at tað oftani eru yvirmenn, ið eru "niðurgerandi" móti mannskapi. Meðan omanfyri í størri mun varð kannað, hvussu leiðsla umborð kann hava jaliga ávirkan á arbeiðsumhvørvið og serliga samskiftið umborð, verður tí nú kannað, um skipari og aðrir yvirmenn kunnu hava neiliga ávirkan á arbeiðsumhvørvið – antin við at skapa eitt ringt umhvørvi beinleiðis, ella við óbeinleiðis ikki at traðka til, tá ið hetta er neyðugt.

Fyrst verður víst á úrslitini til spurningin "Um tú hevur upplivað, at tú ella onnur hava verið fyri happing ella chikanu umborð seinastu 5 árini, hvør stendur oftast fyri hesi atferð". Av teimum spurdu sjófólkunum siga 64.8 % seg ikki hava upplivað happing móti sær ella øðrum. Tey flestu, ið hava upplivað happing av sær ella øðrum, svara, at hon er framd av starvsfelagum við somu positión sum móttakarin – 19.5 %. Harafturímóti svara 12.9 % leiðsla og 11.4 % starvsfelagar í lægri positión. Í hesum tølum eru tey svar, ið nevna fleiri starvsbólkar, løgd afturat tí einkulta svarinum, so vísast skal eisini á, at umleið 6 % av sjófólkunum svara, at tað er ein samanseting av tveimum ella trimum av svarmøguleikunum.




Eftir hesum svarum at døma, er tað sostatt ikki rætt, at tað oftast eru sjófólk við hægri positión, ið happa ella chikanera onnur umborð, men oftast javnbjóðis starvsfelagar. Tó skal vísast á, at tað kemur minst fyri, at hesin atburður fer fram uppeftir, tó munurin á tølunum fyri lægri positión og leiðslu ikki

er stórur. Hóast happing og chikana aldri skal koma fyri, óansæð frá hvørjum, er tað serliga neiligt at síggja, at 12.9 % uppliva, at sjálv leiðslan, ið skal virka sum fyrimynd fyri restina av manningini, eisini fremur atburð, ið er vorðið fatað sum happing ella chikana. Tað gerst eisini torført at forða fyri happing og chikanu, um tann, ið fráboðast skal til, sjálv/ur er atvoldin til trupulleikan.

Við spurnakanningini varð við øðrum spurningum lýst, í hvønn mun sjófólk upplivdu mismun. Sí svarini til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Øll manningin fær eins viðferð, óansæð kyn og bakgrund”. Av sjófólkunum vóru 30.5 % sera samd, 40.6 % samd, 14.1 % svaraðu hvørki ella, 8.6 % vóru ikki samd og 6.3 % als ikki samd. Sostatt meta gott 70 %, at har er lítil ella ongin mismunur, meðan umleið 15 % meta, at mismunur er umborð.




Mett verður, at skipabólkarnir eru nakað javnir sum heild hesum viðvíkjandi, tó tað møguliga er størri mismunur á fiskiskipum enn á handilsskipum. Verður hugt at muninum millum starvsbólkarnar, er tað sera áhugavert at síggja, at skiparar í nógv størri mun meta, at munur ikki verður gjørdur á sjófólki, enn restin av manningini. Hetta kann tala fyri, at skiparin ikki hevur somu fatan av støðuni enn onnur. Meiri enn helvtin av øllum starvsbólkunum meta ikki, at stórvegis munur verður gjørdur, men eru eisini partar av øllum starvsbólkunum, serliga brúgvayvirmenn og maskinyvirmenn, men eisini dekkarar, ið uppliva størri mismun.



50,0%
45,0%
40,0%
35,0%
30,0%
25,0%
20,0%
15,0%
10,0%
5,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
0,0%
13,6%
6,3%
4,0%
5,8%
33,3%
9,1%
12,5%
4,0%
5,0%
0,0%
13,6%
13,8%
20,0%
14,2%
44,4%
36,4%
38,8%
32,0%
44,2%
22,2%
27,3%
28,8%
40,0%
30,8%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
2,3%
13,7%
7,7%
0,0%
0,0%
4,8%
0,0%
9,8%
9,6%
9,5%
0,0%
12,0%
9,3%
17,6%
23,1%
9,5%
16,7%
9,6%
37,2%
33,3%
32,7%
57,1%
50,0%
47,0%
51,2%
25,5%
26,9%
23,8%
33,3%
26,5%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Verður hugt at býti millum ymiskar tjóðskapir, er tað áhugavert at síggja, at tað serliga eru føroyingar, ið meta, at munur verður gjørdur. Hetta er áhugavert, tí vanliga verður sagt, at serliga tjóðskapir, ið ikki eru meirilutin, eru í vanda fyri at vera fyri mismuni. Hetta sæst eisini í hesi kanning við at sjófólk, ið ikki eru úr Evropu, sum annars generelt hava verið sera jalig í teirra svarum, eru einans 21.4 % sera samd í, at manningin verður viðfarin eins, og 7.1 % eru ósamd. Altso er tað eisini á føroyskum skipum vandi fyri, at tú grundað á annan tjóðskap verður viðfarin øðrvísi. Eitt sjófólk hevur tó eisini víst á, at av tí hann er av blandaðum uppruna (bæði føroyskur og annað), upplivir hann mismun grundað á tjóðskap, og kunnu summir av føroyingunum sostatt verða fyri mismuni grundað teirra uppruna.




Fyri føroyingarnar man tó í flestu førum verða aðrar frágreiðingar. Tað verður í kanningini víst á onnur dømi, sum at onkur kennir mismun grundað á lægri starv, at annar grundað á arbeiðsbyrðu hjá konufólkum og mannfólkum, onnur vegna aldur og síðani sum heild persónleikanum hjá persóni, ið fremur mismunin.

Ein kensla av mismuni og órættvísi kann ávirka trivnaðin í arbeiði sínum sum heild, og mett verður, at ein serliga skal ansa eftir, at mismunur ikki fer fram yvirfyri minnilutabólkum umborð, sum t.d.

sjófólki av øðrum uppruna, kyni, seksualiteti ella religión. Eisini má forðast fyri mismuni generelt, ið ikki hevur beinleiðis við arbeiðsatlit og førleikar hertil at gera.



Til spurningin “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Leiðslan tekur happing og chikanu í álvara” hava 31.6 % svarað, at tey eru sera samd, 29.3 % eru samd, 24.2 % svaraðu “hvørki ella”, 7 % eru ósamd og 7.8 % eru als ikki samd.

Sostatt eru meiri enn 60 % av føroyskum sjófólki samd í, at leiðslan tekur happing og chikanu í álvara, meðan umleið 15 % meta, at leiðslan ikki tekur hetta í álvara, og 24.2 prosent hvørki eru samd ella ósamd í, at leiðslan tekur happing og chikanu í álvara.




Hyggur ein at svarunum býtt á skipabólkar, sæst stórur munur á, um sjófólkini meta, at leiðslan tekur happing í álvara. Hetta verður mett til at vera tikið í størri álvara umborð á handilsskipum enn við fiskiskipum, tó tað skal nevnast, at fyri allar skipabólkar eru partar av sjófólkunum, ið ikki meta, at hetta verður tikið í álvara.

Munurin millum skipabólkarnar sæst serliga, um ein hyggur at, hvussu nógv siga seg vera sera samd í útsøgnini, har umleið 40 % av teimum, ið ávikavist sigla við handilsskipum undir og yvir 500 BT, eru sera samd, meðan talið fyri fiskiskip undir og yvir 500 BT er umleið 22 %.

Tað bendir á, at serliga umborð á handilsskipum yvir 500 BT verður happing tikin í álvara, tí tá svara eisini 34.2 %, at tey eru samd í útsøgnini, ið tilsamans gevur 72.5 %. Umborð á smærri handilsskipum svara einans 20 %, at tey eru samd, so talið verður nakað lægri á 60 %, men er hetta enn hægri enn

samlaða talið fyri fiskiskip yvir 500 BT, ið verður 52.5, og fiskiskip undir 500 BT, ið er á einans 40.9 %.

Um ein hyggur at teimum, ið svara annaðhvørt, at tey eru samd ella als ikki samd, eru heili 18.2 % av teimum, ið sigla við fiskiskipum undir 500 BT, ið als ikki eru samd, og 12 % av teimum, ið sigla við handilsskipum undir 500 BT svara, at tey als ikki eru samd, og 4 % svara, at tey eru ósamd. Við hesum skipabólkum eru serliga nógv, ið siga seg als ikki vera samd, meðan prosentparturin av teimum, ið sigla við handilsskipum er umleið helmingurin av hesum. Kanningin vísir, at 10 % av teimum, ið sigla við fiskiskipi yvir 500 BT, og 6.7 % av teimum við handilsskipi yvir 500 BT, svara, at tey vóru ósamd í útsøgnini. Sostatt er ikki stórvegis munur á, hvussu stórur partur, sæð samlað, metir, at leiðslan ikki tekur hetta í álvara, tó parturin av sjófólki við handilsskipi yvir 500 BT er nakað minni, og tað er størri partur av skipum undir 500 BT, ið als ikki meta hetta, harav serliga fiskiskip.

Eisini áhugavert er tað at síggja, at umborð á fiskiskipum eru sera nógv, ið svara "hvørki ella" til spurningin – ávikavist 40.9 % fyri fiskiskip undir 500 BT og 31.3 % fyri fiskiskip yvir 500 BT. Tað, at ein stór óvissa er um hetta umborð á fiskiskipum, meðan ein størri partur av handilsskipum eru samd í, at leiðslan tekur evnið í álvara, kann vera ein ábending um formellar mannagongdir og greiða leiðslu á økinum umborð á handilsskipum, meðan tað kann vera ein størri óvissa í leiðsluni á summum fiskiskipum og vantandi orðaskifti um, hvønn hugburð ein hevur til happing og chikanu.

Mett verður, at tað er eitt jaligt tekin, at ein stórur partur av sjófólkinum hevur fingið greið boð um, at happing og chikana verður tikið í álvara. Hinvegin vísir tað á greiðar avbjóðingar í leiðsluni, at so mong kenna óvissu, um hvussu leiðslan metir um málið, og at onkur enntá hevur fingið ábendingar um, at málið ikki hevur týdning.



Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
50,0%
45,0%
40,0%
35,0%
30,0%
25,0%
20,0%
15,0%
10,0%
5,0%
0,0%
44,4%
40,9%
31,3%
24,0%
15,0%
18,2%
11,1%
12,0%
6,3%
5,8%
11,1%
10,0%
6,7%
4,0%
0,0%
34,2%
30,0%
20,0%
18,2%
11,1%
40,0%
38,3%
22,2%
22,7%
22,5%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT

Omanfyri eru spurningar viðgjørdir, ið kunnu vísa, hvønn hugburð leiðslan hevur ella sýnist at hava. Hóast ein skipari greitt kann hava víst á, at happing og chikana verður tikin í álvara, og at sjófólk skulu viðfarast eins, kann tað verða trupult at handfara tær konkretu støðurnar. Sostatt verða greinaðir spurningar um leiðslunnar handfaring av happing og diskriminatión.

Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Leiðslan umborð dugir væl at handfara happing ella aðra skaðandi sosiala atferð umborð" vóru 23 % sera samd, 33.2 % samd, 25.8 % svaraðu "hvørki ella", 9 % vóru ikki samd og 9 % vóru als ikki samd. Sostatt var umleið helvtin samd, meðan 18 % ikki vóru samd og 25.8 % vóru eitt stað harímillum.




Til spurningin "Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Leiðslan umborð dugir væl at handfara trupulleikar við sexismu ella aðrari diskriminatión" varð úrslitið líknandi, tó at nakað færri vóru sera ósamd. Hesi úrslit kunnu benda á, at summir skiparar og aðrir leiðarar møguliga vanta førleikar ella amboð at loysa tílíkar konfliktir, og kundi sjóneykan møguliga verið sett á henda trupulleika.




Um ein samanber úrslitini fyri hesar spurningar við úrslitini fyri spurningin, um manningin fær eins viðferð, er tað týðiligt, at parturin, ið svarar "hvørki ella", er minni til tann spurningin (14.1 %) enn til hesar, ávikavist 25.8 og 28.5 %. Ein grundgeving kann vera, at ein stórur partur av sjófólki hevur givið til kennar, at sexisma og diskriminatión ikki er partur av sosialu samanhangunum umborð, og tískil hevur leiðslan ikki havt orsøk at handla. Sostatt veit manningin ikki, hvussu leiðslan hevði handfarið støðuna, um hon eftir teirra tykki ikki er íkomin.

Verður hugt at muni millum skipabólkarnar til seinna spurningin sæst, at hetta er ein trupulleiki við øllum skipabólkum, tó viðurskiftini viðvíkjandi hesum sýnast best umborð á handilsskipum yvir 500 BT.

Starvsbólkarnir sýnast allir sum heild at vera samdir, tó at einans 2 % av skiparum ikki meta, at leiðslan dugir væl at handfara diskriminatión. Sostatt hevur leiðslan aftur her eina aðra fatan av støðuni enn mannskapi, og er týdningarmikið at hava hetta í huga. Eisini er tað týdningarmikið at vísa á hesi 2 %, sum týða á, at summir skiparar kenna seg ótryggar í støðum við sexismu og diskriminatión, og sostatt kann vera torført at handfara støðuna hóskandi.



60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
54,5%
40,8%
36,0%
33,3%
33,3%
31,3%
32,0%
28,0%
27,5%
23,8%
23,3%
22,2%
22,7%
21,7%
15,0%
11,1%
9,1%
9,1%
7,5%
6,7%
4,5%
4,0%
2,5%
0,0%
0,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT



60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
0,0%
9,8%
9,6%
0,0%
0,0%
3,6%
2,3%
7,8%
11,5%
14,3%
0,0%
14,5%
25,6%
27,5%
30,8%
19,0%
16,7%
32,5%
44,2%
37,3%
19,2%
52,4%
50,0%
28,9%
27,9%
17,6%
28,8%
14,3%
33,3%
20,5%
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Viðvíkjandi spurningi um diskriminatión er tað viðkomandi at hyggja at, um ávísir bólkar uppfata støðuna øðrvísi. Tað er áhugavert, eins og við spurninginum um eins viðferð, at einans helvtin av føroyingum meta, at leiðslan dugir væl at handfara diskriminatión. Parturin av føroyingum, ið ikki eru samd í, at leiðslan dugir væl at handfara sexismu ella aðra diskriminatión, er nakað tann sami, sum hann varð fyri tey, ið ikki mettu, at øll manning fekk eins viðferð (umleið 18 %). Tó eru heili 32.5 %, sum svara "hvørki ella" til henda spurning, mótvegis 16.3 % til fyrra spurningin. Hetta kann stuðla undir ástøðinum um, at parturin av teimum, ið svara "hvørki ella" gerst størri, grundað á, at sjófólkini sigla við skipum, har leiðslan ikki er noydd at tala at diskriminatión – hetta grundað á, at stórur partur av føroyskum sjófólki sigla við skipum, ið einamest hevur føroyingar av sama kyni og átrúnaðarligu bakgrund.

Verður hugt at úrslitunum fyri sjófólk, ið ikki eru norðurlendingar, sæst, at sjófólkini eru meiri negativ í teirra svarum, enn tey annarts hava verið gjøgnum kanningina. Sostatt gevur kanningin eina ábending um, at hóast flestu sjófólk hava eina positiva uppliving av teirra leiðslu viðvíkjandi handfaring av sexismu og diskriminatión, eru partar av bæði meirilutanum og minnilutanum, ið ikki meta, at leiðslan megnar hesa uppgávu til fulnar.




Við fyrivarni fyri, at sera fá svar eru fingin frá konufólkum, verður víst á, at spurdu konufólkini sum heild meta, at leiðslan dugir væl at handfara sexismu og aðra diskriminatión, meðan tey, ið ikki halda hetta, eru mannfólk. Sostatt geva svarini ábendingar um, at teir leiðarar, ið hesar kvinnur hava, megna væl uppgávuna, at konufólk gerast partar av manningini eisini. Tó skal vísast á, at summi mannfólk

meta seg vera fyri vanbýti samanborið við konufólkini – sum víst á í hesi viðmerking: “*Ofta síggja vit, at kvinnur sleppa nógv lættari í arbeiðinum, og sleppa oftari undan arbeiði*”. Tað er soleiðis týdningarmikið, at atlit verða tikin til nýggju samansetingina um borð, við bæði konufólkum og mannfólkum, og at leiðslan tryggjar kenslu av rættvísi og javnbjóðis krøv í arbeiðinum, í tann mun hetta er møguligt – fyri at varðveita samstarv og virðing í mannskapinum.




Verður hugt at aldursbýtinum, kann tað vera ábending um, at tess eldri sjófólkini eru, meiri nøgd eru tey við handfaringina hjá leiðsluni av sexismu og diskriminatión. Tó er hett ikki galdandi fyri yngsta aldursbólkin, har lutfalsliga fá ikki eru samd í útsøgnini, og eru tað serliga nógv (40 %), ið svara “hvørki ella”. Hetta kann aftur koma av, at føroysku sjófólkini oftast byrja sína starvsleið á sjónum í fiskiflotanum, har homogeniteturin á flestu føroysku skipunum framvegis er stórur, og tískil hava mong ikki sæð leiðslunnar handfaring av tílíkum málum. Henda grundgeving kann tó í øðrum førum illani svara, hví aðrir aldursbólkar svara “hvørki ella”, sum t.d. sæst á, at eisini 35.5 % av teimum millum 46 og 55 ár svara eins, hóast meiri enn helmingurin av teimum sigla við handilsskipum, ið oftani hava fjølbroyttari manning.


Procentpartur av sjófólki býtt á aldur
60,0%
50,0%
40,0%
30,0%
20,0%
10,0%
0,0%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Aldur / Age
16 - 25
26 - 35
36 - 45
46 - 55
56 - 65
66 - 75
3,7%
9,1%
8,1%
3,2%
1,8%
0,0%
3,7%
13,6%
17,7%
6,5%
7,3%
0,0%
40,7%
34,1%
21,0%
35,5%
20,0%
16,7%
29,6%
20,5%
29,0%
38,7%
43,6%
50,0%
22,2%
22,7%
24,2%
16,1%
27,3%
33,3%

Fyri at leiðslan kann taka hond um happing umborð krevst í fyrstu atløgu, at fráboðanirnar um happing og chikanu koma á rætta stað. Fyri at kanna um sjófólk á føroyskum skipum eru kunnað um mannagongdir hesum viðvíkjandi varð spurt “Út frá tínum upplivingum umborð á føroyskum skipi seinastu 5 árini, hvussu samdur ert tú við fylgjandi útsøgn: Eg veit, hvønn er skal venda mær til, um eg skal boða frá happing ella chikanu”. Til hetta svaraðu 38.7 %, at tey vóru sera samd, 41.4 % at tey vóru samd, 11.3 % hvørki ella, 4.7 % ikki samd og 3.9 % vóru als ikki samd. Sostatt vita gott 80 %, hvagar tey skulu venda sær. Hetta er sera positivt. Ynskiligt hevði tó verið, at øll vóru kunnað um mannagongdirnar, og at enn fleiri vóru sera samd.




Verður hugt at skipabólkum, síggjast ábendingar um, at serliga sjófólk við handilsskipum, serliga yvir 500 BT, eru vís í, hvønn fráboðast skal til, meðan lutfalsliga stórur partur av sjófólki við fiskiskipum undir 500 BT ikki veit hetta, og sjófólk við fiskiskipum yvirhøvur eru meiri ivasom enn sjófólk við handilsskipum. Hetta kann vísa ein samanhang millum, at teir skipabólkar, har krav er um meiri skipaðar mannagongdir, eru sjófólkini meiri upplýst um, hvar fráboðast skal. Tó skal vísast á, at umborð á øllum skipabólkunum eru sjófólk, ið ikki vita, hvønn ein skal venda sær til. Tí verður mett, at øll reiðarí skulu hyggja at, um tað er og verður nóg væl lýst fyri teirra sjófólkum, hvussu fráboðast skal, um hetta verður neyðugt. Verður hugt at svarunum býtt eftir starvsbólkum, er tað serliga týðiligt, at reiðarí eiga at taka hetta í álvara, tí fleiri skiparar og brúgvayvirmenn eru í iva um, hvønn tey skulu venda sær til. Sostatt er vandi fyri, at fráboðanir aldrin náa rætta stað, so hond kann takast um hesar. Eisini er vandi fyri, at skiparar ikki fáa møguleika at handfara støðuna og/ella biðja um ráðgeving frá avvarðandi reiðarii, um hetta gerst neyðugt.



Procentpartur av sjófólki býtt á skipabólk
70,00%
60,00%
50,00%
40,00%
30,00%
20,00%
10,00%
0,00%
0,00%
13,64%
1,25%
8,00%
3,33%
0,00%
4,55%
7,50%
4,00%
3,33%
11,11%
18,18%
15,00%
16,00%
6,67%
22,22%
45,45%
47,50%
28,00%
40,83%
66,67%
18,18%
28,75%
44,00%
45,83%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur /Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Hvørjum skipaslagi hevur tú í...
Bæði handilsskip og fiskiskip / Both fishing vessel and merchant vessel
Fiskiskip undir 500 BT / Fishing vessel under 500 GT
Fiskiskip yvir 500 BT / Fishing vessel over 500 GT
Handilsskip undir 500 BT / Merchant vessel under 500 GT
Handilsskip yvir 500 BT / Merchant vessel over 500 GT


70,00%
60,00%
50,00%
40,00%
30,00%
20,00%
10,00%
0,00%
Procentpartur av sjófólki býtt á starvsbólk
66,67%
52,38%
51,16%
45,78%
44,23%
41,18%
34,88%
34,62%
34,94%
33,33%
33,33%
29,41%
17,65%
10,84%
9,30%
9,62%
9,52%
0,00%
7,84%
5,77%
2,33%
2,41%
0,00%
0,00%
5,77%
3,92%
4,76%
6,02%
2,33%
0,00%
Als ikki samd/ur / Strongly disagree
Ikki samd/ur / Disagree
hvørki ella / Neutral
Samd/ur / Agree
Sera samd/ur / Strongly Agree
Svar
Starv / Occupation
Skipari / Master
Annar brúgvayvirmaður / Other Navigational Officer
Maskinyvirmaður ella skipselektrikari / Engineer Officer or Electro-Technical Engineer Officer
Skipskokkur / Ships' Cook
Maskinmaður, sum ikki er yvirmaður / Junior Engineer
Dekkari / Able or Ordinary Seafarer

Hóast flestu sjófólk vita, hvar boðast skal frá happing og chikanu, skal vísast á áðurnevndu úrslit, sum góvu ábendingar um, at leiðslan í summum førum ikki megnar at handfara støðuna og/ella enn tá er partur av trupulleikan. Tað er tískil sera týdningarmikið, at reiðaríið eisini vísir leiðsluni stuðul í handfaring av truplum støðum, og á klárar mannagongdir, har møguleiki er at boða reiðarínum frá trupulleikum við happing umborð, um tað ikki er møguligt at boða frá til tættasta leiðara. Tað er eisini sera týdningarmikið at veita trygd fyri, at starv sjófólksins ikki er í vanda grundað á tílíkar fráboðanir, og at fráboðast kann dulnevnt.

## Niðurstøða – leiklutur hjá leiðslu umborð og á landi

Í kapitlunum omanfyri var niðurstøðan, at sum heild var eydnast at skapa trivnað umborð, har stórur partur av sjófólkum á føroyskum skipum eru nøgd við sosiala arbeiðsumhvørvið, tó at átaluverdur atburður og neiligar upplivingar verða fráboðaðar umborð á øllum skipasløgum. Hesin atburður skal sjálvandi takast í størsta álvara og handlast uppá, og varð í hesum kapitli hugt nærri at, hvussu leiðslan kann fáa positiva ávirkan á trivnaðin.

Vísast skal fyrst á, at sambært sjófólkunum høvdu 64.8 % ongantíð upplivað happing móti sær ella øðrum umborð, meðan onnur upplivdu happing frá sjófólkum við somu position (19.5 %), men síðani eisini frá leiðslu (12.9 %) og starvsfelagum í lægri position (11.4 %). Happing kann sostatt koma frá øllum løgum, men er tað serliga atfinningarsamt, at sjálv leiðslan, ið fráboðast skal til, er partur í hesum. Sostatt má fyrst og fremst reiðaríið boða frá, at tílíkur atburður ikki verður góðtikin, og mugu skiparar umhugsa egnan atburð, so teir kunnu virka sum fyrimyndir fyri restina av manningini. Til hetta sæst eisini, at munur er á svarum frá manning og skiparum viðvíkjandi um øll manning fær eins viðferð, óansæð kyn og bakgrund, har skiparar sóu minni mismun enn restin, eins og skiparar í nógvum viðurskiftum fevnd av hesi kanningini hava havt øðrvísi uppfatan enn manningin annars. Til hetta verður sostatt mett, at fleiri reflektiónir skulu vera frá leiðsluni um støðuna, men eisini viðmæli til manningina at boða frá manglum á sosiala økinum, eins væl og á tekniska økinum.

Kanningin hevur víst, at sosialisering og týðulig leiðsla er týdningarmikil umborð á skipi, har stór útskifting av starvsfólkum ofta fer fram. Í hesum samanhangi svarar umleið helvtin av sjófólkunum, at tey fáa leypandi feedback upp á sítt arbeiði, og verður hetta serliga nýtt umborð á stórum handilsskipum og sjáldan á smáum fiskiskipum. Fyri sálarligu heilsuna er eisini týdningarmikið, at sjófólkini kenna seg hoyrd, og til hetta svara meiri enn 3 fjórðingar, at tey meta seg hava ávirkan á egnar arbeiðsuppgávur.

Afturat hesum skal vísast á, at kenslan hjá sjófólkum at hava ávirkan á egnar arbeiðsuppgávur tykist at vera størri á teimum skipabólkum, har fleiri sjófólk siga seg tora at tala at, um tey uppliva, at tey sjálvi ella onnur eru úti fyri happing. Títtleikin av negativum sosialum atburði umborð á skipum tykist ikki at hava avgerandi týdning í hesum sambandi, og brúk av leypandi feedback sýnist ei heldur at ávirka, um sjófólk tora betri at tala at. Mett verður sostatt, at eitt gott hugskot er at nýta leypandi feedback ella líknandi umborð fyri at økja um samskifti, og fyri at manningin skal kenna seg trygga í, hvussu uppgávur skulu loysast. Samstundis má tryggjast, at samskiftið ikki gerst einvegis, men at manningin fær kenslu av at hava ávirkan á egnar uppgávur og møguleika at siga frá neiligum sosialum viðurskiftum.

Tá hetta er sagt, er jaligt, at næstan tríggir fjórðingar av teimum spurdu kenna seg trygg at tala at, um tey sjálvi ella onnur eru úti fyri happing og sostatt forða fyri tílíkum atburði. Ynskiligt er tó, at fleiri kenna seg trygg at tala at, og serliga skal ein halda eyga við viðurskiftunum hjá ungum sjófólki og teimum við uppruna frá øðrum londum enn norðurlondum, sum kenna seg nakað ótrygg at tala at, um happing verður framd. Tá er tað jaligt, at flestu skiparar kenna seg tryggan at tala at, og vónandi kunnu steðga happingini, um teir gerast varugir við tað. Her má tó aftur nevnast, at skiparar nógvum førum ikki er varugur við trupulleikarnar, og sostatt mugu fyrst av øllum setast tiltøk í verk, sum eggja sjófólki til at boða frá trupulleikum við trivnaði umborð. Eisini skal vísast á, at heili 7 % av skiparunum ikki kenna seg tryggar at tala at, og tí má kannast, hvussu ein kann stuðla skiparum í hesum.

Yvirhøvur verður mett, at skiparin stendur við eini størri avbjóðing við at tryggja trivnað umborð, nú manningin er vorðin meiri fjølbroytt, og ivasamt er, um øll hava fingið nøktandi amboð til hetta. Í hesum sambandi vísti kanningin, at ikki-evropearar møguliga kenna nakað av diskriminering. Harafturat mettu lutfalsliga nógvir føroyingar, at munur verður gjørdur á sjófólki. Sostatt má hyggjast eftir, um munur verður gjørdur á sjófólki sum heild, og samstundis skal serligt atlit takast til minnilutar.

Harafturat metti einans umleið helvtin av teimum spurdu, at leiðslan dugdi væl at handfara happing, diskriminatión ella aðra skaðandi atferð. Ein stórur partur av teimum, ið ikki vóru samd, valdu tó “hvørki ella”. Ivasamt er, hví hetta man vera, men tað er hugsandi, at tað ikki hevur verið neyðugt at handfara nakað konkret – men tað vísir møguliga eisini, at leiðslan ikki hevur ein greiðan boðskap um hetta. Eisini skal nevnast, at skipararnir geva sær sjálvum nógv betri karakter fyri handfaringina enn restin av manningini.

Hóast svarini frá konufólkunum eru fá, kunnu tey benda á, at kvinnurnar meta leiðsluna handfara sexismu hóskandi, meðan summi mannfólk kenna órættvísi, t.d. viðvíkjandi arbeiðsbyrðu. Sostatt má atlit takast til, hvussu ein best tekur í móti kvinnum í vinnuni og samstundis setir javnbjóðis krøv til manningina, har tað ber til.

Umborð á øllum skipabólkum eru sjófólk, ið ikki meta, at leiðslan tekur happing og chikanu í álvara, og einans umleið 60 % meta, at hesi viðurskifti verða tikin í álvara. Stórur munur er millum svarini, har sjófólk við handilsskipum í nógv størri mun meta, at leiðslan tekur hetta í álvara, og millum handilsskip yvir 500 BT og fiskiskip undir 500 BT eru heili 30 prosentstig á muni, og næstan fimti hvør umborð á fiskiskipum undir 500 BT metir ikki, at evnið verður tikið í álvara.

Úrslitini geva eisini ábendingar um, at yvirhøvur er ein stór óvissa viðvíkjandi raðfestingini hjá leiðsluni av evninum, og óvissan er størri umborð á fiskiskipum enn handilsskipum. Hetta talar aftur fyri, at reiðarí og skiparar alment eiga at geva greið boð um, at tílíkur atburður ikki verður góðtikin, og at almennar mannagongdir vera settar í verk. Kanningin vísir, at gott og væl 80 % vita, hvar tey skulu boða frá happing og chikanu, og minni óvissa um hetta er umborð á handilsskipum enn á fiskiskipum. Nevnast skal, at sjálvt skiparar og stýrimenn ivast í, hvar fráboðast skal, og tí er vandi fyri, at mál ikki verða rætt handfarin. Mett verður, at tað fyrst og fremst má staðfestast, hvussu eitt mál um happing skal handfarast, um ein framhaldandi skal arbeiða í móti einum máli at minka um tílíkan atburð á føroyskum skipum.